Nr. 13 • apríl 2012

# MIÐ & MAGN

Føroya Skipara- og Navigatørfelag & Maskinmeistarafelagið




Ferðaætlanin hjá Norrønu er at lesa á síðu 21

**ÚTGEVARI**
Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag geva MIÐ & MAGN út í felag.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið.

**BLAÐNEVND**
Páll Hansen (ábyrgd)
Regin Nónstein
Eyðstein Djurhuus
Jóan Petur Patursson

**MASKINMEISTARAFELAGIÐ**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Telefon 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG**
Jekaragøta 10
Postboks 248
110 Tórshavn
Telefon: 31 69 73
Teldupostur: fsn@fsn.fo

**BLAÐHALD**
Tey, sum ynskja at halda MIÐ & MAGN, kunnu boða frá hesum í teldupost til:
bladhald@midogmagn.fo
Haldara gjaldið er 200,- kr. um árið; t.v.s. 4 bløð.

**ENDURGEVING**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst.
MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
www.mf.fo
www.fsn.fo

**FORSÍÐUMYND**
Norrøna

**UMSITING**
Sp/f MEDIA
info@midogmagn.fo

**UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Føroyaprent · www.foroyaprent.fo

UPPLAG: 1900



# Meðan vit bíða eftir makreli

Í sambandi við makrelfiskiskapin hevur ljós verið varpað á fleiri áhugaverd viðurskifti. Úr rúgvuni kunnu vit nevna spurningin um útlendingar við føroyskum skipum.

Í 2010 mæltu manningarfeløgini landsstýrismanninum til at gera neyðugar broytingar í útlendingakunngerðini.

Manningarfeløgini mæltu til at gera kunngerðina greiðari so, at eingin ivi kann vera um, nær útlendingar skulu hava føroyskt arbeiðsloyvi.

Útlendingaøkið er danskt málsøkið, men Útlendingastovan hevur hoyringsmyndugleika í útlendingamálum. Tað er § 13 í útlendingalógini og § 33 í útlendingakunngerðini, sum eru høvuðsásetingarnar. § 33 í útlendingakunngerðini ljóðar soleiðis „Udlændinge skal foruden i de tilfælde, der er nævnt i udlændingelovens §13, stk. 1, have arbejdstilladelse på Færørne til arbejde på søterritoriet og kontinentalsokkelen.

Greinin er ógvuliga vítt orðað, og vit kunnu leggja afturat, at viðurskiftini á sjóøkinum eru sera ymisk í Føroyum samanborið við Danmark.

Her lata føroyskir myndugleikar danska Integrationsministeriet tulka, hvussu umfatandi føroyskt „søterritoriet“ er. Hetta eiga vit ikki at góðtaka.

Nú hevur so Innlendismálaráðharrin boðað frá, at útlendingalógin skal yvirtakast í januar 2013. Í fjør fingu vit eina makrellóg. Í §5 í hesi lóg var ásett, at manningar á fiskiskipum undir føroyskum flaggi, sum fáa fiskiloyvi at fiska makrel í 2011 skuldu lønast eftir føroyskum sáttmálum.

Tað eru bert manningarfeløgini, sum hava sáttmálar á hesum øki, so her skuldi ikki verið nakar ivi.

Í §10 í hesi lóg stendur enntá, hvussu revsast skal, tá ið ásetingarnar í §5 ikki verða hildnar.

Her mugu vit gera vart við, at í 2011 vísti føroyski eftirlitsmyndugleikin ongan áhuga fyri hesi lóg – bert líkasælu.

Nú skriva vit 2012, og nærkast aftur makrelfiskiskapi í føroyskum sjógvi. Í hesum sambandi verður áhugavert at síggja, um føroyski myndugleikin hevur somu støðu í 2012, sum hann hevði í 2011.

Tað er einki at ivast í, at skip, sum ikki fiska eftir sáttmála við føroysku manningarfeløgini eiga at missa fiskiloyvið.

**So einfalt er tað.**

*Vegna Føroya Skipara- og Navigatørfelag*
*og Maskinmeistarafelagið*
*Páll Hansen, ábyrgdarblaðstjóri*




# Innihaldsyvirlit


Aðalfundur: Maskinmeistarafelagið . . . . . . . . . . . . 4

Stórur áhugi fyri nýggjari reiniskipan . . . . . . . . . . 12

Oljureinsaða vatnið er reint sum drekkivatn. . . . . 14

Vinnuháskúlin: Prógv Maskinistar . . . . . . . . . . . . . 16

Nýtt róður. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 18

Brennidepilin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 22

Sáttmálaloysi í danska handilskipaflotanum . . . . . 25

Tíðindi frá Skipara- og Navigatørfelagnum. . . . . . 26

Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum. . . . . . . . . . . 28

Føðingardagar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 30

Minningarorð. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 31

Trygd skal vera ein sjálvfylgja . . . . . . . . . . . . . . . . . 32

Námsferð: Indian Point Energy Center . . . . . . . . . 38







# Páll vann formansvalið



*Páll Hansen, formaður*



*Jákup Jacobsen, formansvalevni*

Árligi aðalfundurin hjá Maskinmeistarafelagnum varð hildin á Hotel Hafnia 3. mars 2012.

Á skránni var m.a. val av formanni og tveimum nevndarlimum. Páll Hansen, sum fyrstu ferð varð valdur til formann í 2007, stillaði uppaftur til formansvalið. Men hesaferð bjóðaði Jákup Jacobsen á Strondum Pálli Hansen av. Sostatt vóru tvey valevni til formansvalið.

Úrslitið av atkvøðugreiðsluni var, at Páll Hansen vann valið og heldur sostatt fram sum formaður hesi næstu trý árini, sum valskeiðið er.

Tveir nevndarlimir stóðu eisini fyri valið, Jóan Petur Patursson í Havn og John Højsted í Hoyvík og teir vórðu báðir afturvaldir. Sostatt broyttist nevndin ikki á aðalfundinum. Umframt hesar tríggjar er Regin Olsen í Klaksvík, næstformaður og Ólavur Gunnarsson í Havn, nevndarlimir.

Fyrsti tiltakslimur er Jákup Jacobsen og annar tiltakslimur er Jón F. Johansen.

Eftir valið takkaði Jákup Jacobsen fyri tey, sum høvdu víst sær álit og ynskti afturvalda formanninum alt tað besta í starvinum og felagnum blíðan byr.



# Munurin veksur ár um ár

Nýggji sáttmálin við Reiðarafelagið fyri Farmaskip kom í gildi 1. september 2011 og hann kann sigast upp til ein 1. mars, tó fyrsta lagi 1. mars 2013.

Maskinmeistarafelagðið, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Fiskimannafelagið samráddust saman um hesa avtalu, men tær gingu sera trekt.

Sáttmálahýran hækkaði 2,5 % í september í fjør og hon hækkaði aftur 1,13 % tann 1. mars 2012.

Fleiri dagføringar blivu eisini gjørdar hesaferð, millum annað hækka viðbøtur fyri størru skipini í frálandavinnuni í framtíðini við sama % sum lønartalvan.

– Lønarlagið í okkara grannalondum hækkar meira á hvørjum árið, enn her hjá okkum, so munurin millum tað, sum okkara sáttmálar geva, og tað sum DIS og NIS geva, blívur bara alsamt størri á hvørjum árið, sigur Páll Hansen.

Sáttmálar eru gjørdir eftir sama leisti við Sp/f Frakt og Sandsøluna og Sandgrevstur.

Tann 10. juni 2011 skrivaðu Føroya Arbeiðsgevarafelag og MF undir semju um sáttmála fyri maskinmeistarar á landi. Hesin var afturvirkandi 1 ár.

Umframt smávegis broytingar í sáttmálatekstinum, hevur semjan við sær eina hækking, sum svarar til tær hækkingar, sum í hesi samráðingarrunduni hava verið á privata arbeiðsmarknaðinum annars, tað



*Regin Olsen, næstformaður*



vil siga 3,62 % í sáttmálatíðarskeiðnum.

Hesin sáttmálin er uppsagdur, og gongur út í juni í ár.

## BATAR AT HÓMA

Í 2011 yvirtók vinnan Trygdargrunnin og hevur hvørt manningarfelag eitt umboð í stýrinum. Tað hevur tikið nakað av tíð at flyta umsitingina úr fiskimálaráðnum og yvir í ALS-húsið.

Samanumtikið hevur hetta gingið gott og alt er við at finna sína føstu legu.

Fiskiskapurin í 2011 hevur verið frægari enn árini frammanundan og hevur betri fiskiskapur, varsemi og at meginreglurnar fýri útgjald eru broyttar, eisini ávirkað samlaðu útgjøldini.

Nevndin fyri grunnin hevur ætlanir at koma við nøkrum broytingum og dagføringum av útgjøldum í 2012.

Páll Hansen sigur, at endamálið við broytingunum er, at hækka útgjøldini, men enn er ov tíðliga at siga, hvussu nógv tað verður.

## FAS OG FMU

Tað hevur verið stórur aktivitetur í FMU so at siga alt árið og hettar hevur kravt stóra orku av felagnum.

– Vit hava fundast bæði í London, Oslo og Gøtuborg. Eisini við landsstýrismannin í vinnumálum, umframt fleiri fundir við Sjóvinnustýrið. Hetta alt fyri at sleppa undan at Merkið bleiv hentleikaflagg, sigur Páll Hansen.

Sum longu nevnt á síðsta aðalfundi, vóru tað Norsk Sjømansforbund, svenska Seko og CO-Søfart úr Danmark sum høvdu heitt á ITF um at seta FAS á FOC listan.

– Hóast fundir við hesi feløg, hevur tað verið sum at sletta vatn á gás. Man hevur allan vegin ígjøgn-





um merkt, at hesi feløg hava arbeitt eftir einari dagsskrá, hvar tey longu høvdu tikið støðu, sama hvørjum argumentum vit komu við.

Hettar var sera keðiligt at merkja og á einum fundi í London komu hini norðurlensku feløgini fram við nógvum hálvum lygnum, so man merkt tíðiliga ein illvilja.

– Tað eydnaðist okkum ikki at forða fyri, at FAS bleiv lýst sum hentleikaflagg, men vit hava lært nógv av hesum, bæði hvat viðvíkur altjóða samstarvi og okkara egna samstarvi millum manningarfeløgini, reiðarafeløg og myndugleikar og ikki minst kunnu vit nú seta andlit á fleiri persónar hjá ITF, sum vit hava møtt í hesum arbeiði, sigur Páll Hansen. Men hann heldur eisini, at føroyingar verða noyddir at taka í egnan barm.



John Højsted, nevndarlimur

– Tær neyðugu broytingarnar í FAS-lógini eru ikki gjørdar, so vit hava ikki rætt at samráðast fyri aðrar enn føroyingar og norðurlendingar. At ov nógv skip eru, sum ikki lúka treytirnar um „beneficial ownership“, er eisini ein trupulleiki.

Vit kunnu gleðast um eitt vaksandi tal av limum við skipum undir FAS og vóna, at hetta fer at halda fram.

– Eisini kunnu vit gleðast um, at tað sær út til, at FAS í nærmastu framtíð ferð at fáa inntøkur frá fremmandum skipum og at Føroyska flaggið nú er komið á hvíta listan hjá Paris MoU.



## SAMLAGSTRYGGINGIN

Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag eru samd um, at umsitingin av samlagstryggingin skal vera á einum stað við einari bókhaldsskipan, sum er gjørd til endamáli.

Semja er eisini um, at tað verður umsitingin hjá Maskinmeistarafelagnum, sum skal taka sær av hesum arbeiði og er avtala gjørd millum feløgini um hettar. Høvuðsuppgávurnar hjá umsitingini verða millum annað mánaðarliga at dagføra limalistan við bókaðum inngjøldum, tilgongd og frágongd og at senda hendan til LÍV.

## LÍV

BankNordik og Vinnumálaráðið boðaðu í januar frá, at eigaraskifti í tryggingarfelagnum LÍV var flutt til juli 2012, men nú hevur BankNordik slept ætlan síni. LÍV er í eini tilgongd við nútímansgerð av pensjónskipanini.

Vit koma nokk at síggja eitt umskifti til marknaðarrentu. Í Danmark hava allir eftirlønarkassanir lagt um til marknaðarrentu. Tað blívur nokk eftir tí sokallaða „lívscyklus pruduktinum", sum í stuttum gongur út uppá, at íløgur verða gjørdar eftir, hvussu mong ár eru til kundin fer á pensjón. Man fær møguleika at velja, um man skal hava eina meira ella minni varna íløgustrategi. Vit koma nokk eisini at síggja nøkur nýggj tilboð seinri í ár.



*Sjúrður Heinesen, skrivari*

## NMF

Tað hava verið tveir fundir í NMF, ein á Álandi og ein í Gøteborg og hevur MF luttikið á báðum hesum fundum.

Á fundinum í Gøtuborg varð skipað fyri einum felagsfundi millum samtøkini fyri maskinmeistarar, navigatørar og vóru stjórarnir fyri norðurlensku sjóvinnufyrisitingarnar bodnir við. Teir umrøddu millum annað sjóvinnupolitikk í teimum skandinavisku londunum og hettar var sera áhugavert.

Annars kann sigast, at tað er ikki nógv vit hava merkt av stuðli frá NMF í okkara samráðingum við ITF.



## ÚTBÚGVING

Ætlanin at byrja bachelorútbúgvingar á Vinnuháskúlanum í ár blivu broyttar, tá vit fingu nýtt landsstýri.

Nýggi landsstýrismaðurin í Mentamálum boðaði frá, tá hann tók við, at hendan ætlan var útsett eitt ár.

Kunngerðin, sum leggur upp til broytingar í útbúgvingini til bachelorstøði hava nú verið úti til hoyringar.

Eisini hevur kunngerð um starvsvenjing umborð á skipum (Aspirantskipan) verið til hoyring.

## ONGAR BROYTINGAR

Annars gjørdi aðalfundurin ongar broytingar í limagjaldinum og Maskinmeistarafelagið er væl fyri fíggjarliga.

Ætlanin er at gera ábøtur á ognina við Grønlandsvegin nakað, millum annað at skifta vindeygu.

Páll Hansen segði, at samstarvið við FSN um limablaðið MIÐ & MAGN hevur virkað væl og hann heldur eisini, at limirnir sum heild hava tikið væl ímóti blaðnum.



# Valdu ímillum pest og kolera

Tá ið støða skuldi takast til semingsuppskoti í samráðingunum við almennu arbeiðsgevararnar, var tað sum at velja ímillum pest og kolera.

Tað segði Páll Hansen, formaður felagsins á aðalfundinum.

Hann segði, at samráðingar við Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið byrjaðu síðst í september.

– Vit vóru ikki komnir langt, tá løgtingsval bleiv útskrivað og samráðingarnar steðgaðu. Frá tí at løgtingsval bleiv útskrivað og til nýtt landsstýrið varð skipað, vóru ongar samráðingar.

– Samráðingar blivu tiknar upp aftur síðst í november, og tá fingu vit boð um, at nú varð nýtt landsstýrið og at tað, sum varð á borðinum fyri løgtingsvalið varð útskrivað, varð tikið av borðinum.

– Í staðin skuldi tosast um lønarniðurskurð.

Páll Hansen segði, at Maskinmeistarafelagið mótmælti hesum og vístu til tær samráðingar, sum høvdu verið áðrenn løgtingsvalið.

– Men her var onki at gera. Vit fingu enntá at vita, at lønarniðurskurðurin skuldi verða 4%.

– Hettar bleiv avvíst og boð



blivu send eftir semingsmonnum. Semingin byrjaði tann 6. Januar og tá gjørdu vit semingsmonnunum greitt, at vit fóru í verkfall um nakar fór niður í løn.

– Longu leygardagin tann 7 januar komu semingsmenninir við einum semingsuppskoti.

Hettar var skjótt, tí semingin hevði tá vart í eitt samdøgur, men tað er nú einaferð soleiðis, at tað eru semingsmenninir sum bestemma nær teir velja at leggja eitt semingsuppskot fram.

– At velja millum semingsuppskoti ella fara í verkfall, var ikki nøkur løtt avgerð – sum at velja millum pest og kolera, segði Páll Hansen.

## FÓRU IKKI AFTUR UM

Finnleif Guttesen var ikki nøgdur við samráðingarnar og hann spurdi, hví Maskinmeistarafelagið var farið til samráðingar fyrst og ikki hevði bíðað, tí við hesum sáttmálanum hevði felagið oyðilagt fyri hini feløgini.

Páll Hansen staðfesti, at Maskinmeistarafelagið hevði ikki lagt seg fram um hini feløgini. Tað vóru hini feløgini, sum høvdu lagt seg aftur um Maskinmeistarafelagið.

Umboð frá fakfelagssamstarvinum hava sagt, at tey samráddust í sjey mánaðir uttan at koma nakran veg.

– Tá ið talan var um lønarniðurskurð, høvdu vit fund við fakfelagssamstarvið og feløgini á almenna økinum og greiddu teimum frá støðuni.

## FRIÐARSKYLDA OG LØNARHÆKKING

Páll Hansen sigur eisini, at spurningurin um Strandferðsluna undir arbeiðssteðgi varð eisini tikin fram undir samráðingunum, eitt nú í semingsroyndunum.

– Maskinmeistarafelagið segði seg væl skilja hendan trupulleikan, men vísti á, at best var at finna eina loysn saman við hinum manningarfeløgunum.

Men skuldi man inn á tankan um eina friðarskyldu, vildu vit síggja lønarhækking aftur fyri.

Felagið vísti í hesum sambandi til sáttmálan fyri skip í frálandavinnuni og tey greiddu eisini semingsmonnunum frá hesu avtalu.

Annars verður MLC 2006 sett í gildi í seinasta lagi 1. januar 2013.

Nýggj kunngerð um hvílitíð hevur verið úti til hoyringar og hendan setur hvílitíðina út frá MLC og sum árið líður, koma fleiri kunngerðir út frá MLC.

Í stuttum ber hon í sær, at í einum seks daga tíðarskeiði skal hvílitíðin verða 77 tímar, afturímóti 70 tímum, sum hon er nú.

# Halda fram í sama góða spori

- Sum heild er Maskinmeistarafelagið væl skipað og eg ætli at gera mítt til, at vit halda fram í sama góða spori.

Tað segði Páll Hansen, tá ið hann endaði aðalfundin hjá Maskinmeistarafelagnum 3. mars 2012.

Páll var afturvaldur til formann á aðalfundinum, men tað nýggja er, at nú skal hann vera formaður burturav, tí tað samtykti aðalfundurin.



Tað merkir, at hann fór í farloyvi hjá SEV 1. apríl 2012, har hann hevur arbeitt á Sundsverkinum í skjótt 38 ár.

Hann viðgongur eisini, at tað verður ein avbjóðing at vera formaður fulla tíð, tí hetta er nakað spildurnýtt, sum ikki er roynt fyrr.

Men hann ivast ikki í, at tað verður ein styrki fyri felagið, tí tá ið formaðurin skal hava annað starv eisini, slepst ikki undan, at okkurt verður forsømt.

– Nú eri eg so at hitta á skrivstovu felagsins allan dagin og tað skuldi gjørt sambandið ímillum felagið og limirnir tættari og betur enn tað hevur verið.

Nú formansstarvið er fulltíðarstarv kemur tað at økja nakað um útreiðslur felagsins. Men har er ongin vandi, felagið er væl fyri fíggjarliga; limatalið hevur í mong ár verið í vøkstri. At limatalið veksur setur størri krøv til felagið; og tí var eisini neyðugt at umleggja formansstarvið.

NÝGGJ REINSISKIPAN

# Stórur áhugi fyri nýggjari reinsiskipan

Hugskotið til spillolju-reinsiskipanina hjá fyritøkuni Green IQ í Kollafirði er væl eldri enn sjálv fyritøkan, ið verður trý ár í ár. Men nústani kenna uppfinnararnir seg til reiðar av álvara at fara undir framleiðslu og marknaðarføring av skipanini, sum teir hava søkt patent upp á.

*Eftir Ingolf S. Olsen*

Tøknin er sera einføld og ómakaleys at fáast við, men effektiviteturin er fleirfaldaður samanborið við aðrar reinsiskipanir. Soleiðis kunnu skotsmálini, sum spillolju-reinsiskipanin hjá fyritøkuni Green IQ fær frá brúkarunum, stutt samansjóðast.

Fyritøkan hevur fyri stutt síðani flutt framleiðsluna úr Kollafirði til Hvalvíkar.

Tað eru teir tríggir Jóhann Fagraklett, Ingi Dam-Jacobsen og Grettir Hammer, ið eiga og reka Green IQ. Fyritøkan varð stovnað í 2009, men hugskotið til reinsiskipanina var longu nøkur ára gamalt tá.

### TVÆR SKIPANIR Í EINARI

Skipanin, nú hon er liðugt ment, er í veruleikanum tvær skipanir, ið hvør sær eru eindømi – ein oljulensiskipan og ein skipan at skilja vatnið frá lensaðu oljuni. Til samans klára tær at taka alla evju upp, og tað ber eisini væl til at brúka tær hvør sær.

– Upprunaliga var tað bara sjálv lensiskipanin, vit arbeiddu við. Vit eru allir maskinmeistarar og vildu finna ein máta at fáa spilloljuna úr kjølinum á skipunum. Við vanligari lensing, verður vatnið pumpað úr kjølinum, og so liggur oljan eftir. Tað er eitt svansut og arbeiðskrevjandi upptak. Men við okkara lensiskipan gera vit tað øvugt. Oljan, sum jú er lættari enn vatn og tí flýtur omaná, verður skúmað omanav, so bara vatn er eftir í kjølinum, greiðir Jóhann Fagraklett frá.

Serliga sundurskiljingarskipanin við sundurskiljingartanganum – eisini róptur separatortangin ella settlingstangin – er komin afturat seinni, tí tað vísti seg, at tradisjonellu sundurskiljingarskipanirnar við filtrum, ventilum og øðrum maskinaríi ikki kláraðu at arbeiða ta at kalla reinu oljuna, sum nú varð lensað úr kjølinum.

### GAMLA TØKNIN VIRKAÐI ILLA

– Tess betur okkara nýggja lensiskipan virkaði, tess verri virkaði lensivatns-separatorurin. Teir verða vanlig róptir 15 ppm-arar, og eru jú ætlaðir at skilja lutfalsliga smáar mongdir av olju frá vatni, sum er høvuðskomponenturin, tá lensað verður upp á gamla mátan. Men nú fingu teir olju sum høvuðskomponent, og tað toldu teir ikki, sigur Jóhann Fagraklett.

Tí fóru teir at eksperimentera við eini nýggjari sundurskiljingarloysn eisini, og fyrstu ferð almenningurin sá nakað til hana, var á fiskivinnumessuni North Atlantic Fish Fair í Klaksvík í fjør vár. Har høvdu teir eina prototýpu av sundurskiljingartanganum við.

– Ein tangi bleiv í skundi settur saman til messuna við vón um, at hann kundi hjálpa okkum at demonstrera okkara oljulensara. Tað var jú hann, sum fokus var á. Men hann riggaði óføra væl, og maskinmenninir, ið komu at hyggja, høvdu bestan hugin á eini skipan við bæði lensara og sundurskiljara, sum vit høvdu har, sigur Jóhann Fagraklett.

Onkrar smávegis tillaging-

ar eru gjørdar á sundurskiljingartangan síðani messuna í Klaksvík í fjør.

## NÁTTÚRULÓGIRNAR RÁÐA

Tað, sum eyðkennir tangan, er, at hann er fullkomiliga leysur av viðlíkahaldi, tí ongir slitlutir eru í honum. hann virkar við at gagnnýta grundleggjandi og púra einfalda vitan um alis- og evnafrøði – nevniliga at olja og vatn ikki kunnu blandast saman, men av sær sjálvum skilja seg sundur. Onkrar snildir eru tó sjálvsagt í tanganum, sum skunda undir hetta fyribrigdið. Prinsippið verður nevnt settling, og tangin er ein settlingstangi, sum ongantíð blívur fullur.

Settlingstangin hevur eisini víst seg at vera framúr væl egnaður at skilja vatnið úr evju/spilloljutangunum umborð á skipunum. Sogið verður í settlingstangan, sum leiðir oljuna/evjuna aftur í evjutangan, meðan vatnið verður leitt niður í kjølin.

Tað sparir bæði tíð og pening, tá vatnið kann skiljast frá evjuni, tí tá er ikki neyðugt hjá skipunum at tøma tangan í heilum.

Fyri móttøkuna á landi er tað eisini ein stórur fyrimunur, at onki vatn er í oljuni, sum kemur í land og skal reinsast og virkast til brenniolju hjá IRF.

Einasti slitlutur á lensaranum er sjálv slangan, so øll skipanin, sum hon er, krevur at kalla onki viðlíkahald. Sjálv pumpan, ið lensar oljuna omanav kjølvatninum, er ein vanlig pumpa, men tó serliga lagað til Green IQ-skipanina.

## VILJA HAVA PATENT

Hjálpt av Íverksetarahúsinum í Klaksvík og tess stjóra Rana Nolsøe hevur Green IQ søkt um patent upp á oljulensaran.

Tann tilgongdin tekur vanliga út við 3 ár. Søkt varð í mai 2010, og nú verður bert bíðað eftir at fáa nøkur formlig viðurskifti í lagi. Hjá Green IQ vóna teir, at patentið er fingið til vega til heystar. Vinnuframagrunnurin hevur eisini játta at hjálpa til fíggjarliga við patentinum, men teir penggarnir kunnu ikki gjaldast út, fyrr enn verkætlanin er liðug.

Síðani North Atlantic Fish Fair í fjør hevur Green IQ selt fýra fullfíggjaðar skipanir.

Fastar skipanir eru settar í skipini Fagraberg, Jupiter og Falk, og Thor í Hósvík hevur keypt eina mobila skipan, ið eftir tørvi kann brúkast umborð á teirra skipum.

– Pumpan hevur havt nakað langa leveringstíð og hevur tí verið fløskuhálsurin, tá vit hava gjørt skipanirnar. Men tá vit hava allar lutirnar, tekur tað bara okkurt um tríggjar dagar at gera eina skipan, sigur Jóhann Fagraklett.

Og Green IQ hevur júst fingið allar lutirnar til 15 fullfíggjaðar skipanir heim, so nú kunnu teir av álvara taka ímóti bíleggingum.

Fyritøkan keypti her fyri ein buss, sum ein skipan verður sett upp í. Síðani verður farið á rundferð at sýna skipanina fram, eins og tað ber til at biðja um eina vitjan av bussinum.



*Jóhann Fagraklett er spentur uppá eftirspurningin eftir nýggju lensi- og reinsiskipanini. Í oljulensaranum verður spilloljan skúmað oman av vatninum. Pumpuinntakið í lensaranum flýtur í vatnskorpuni undir oljulagnum, so at oljan rennur niður í inntakið. Í separasjónstanganum, settlaranum, syrgja náttúrulógirnar fyri, at tað sindrið av vatni, ið verður pumpa upp við spilloljuni, skilir seg frá, so reint vatn og olja kunnu tømast úr aftur tanganum gjøgnum hvør sítt rør.*

# Oljureinsaða vatnið er reint sum drekkivatn

Higartil er reinsiskipanin frá Green IQ sett upp umborð á trimum føroyskum skipum, og maskinmenninir rósa henni til skýggja. 1. meistarin á Fagrabergi hevur smakkað upp á reinsaða lensivatnið, og tað kundi væl drekkast.



*Joen Jacob á Fløtunum hevur sera drúgvar royndir sum maskinmeistari og hevur bert gott at siga um reinsiskipanina frá Green IQ. – Eg fór at sigla sum maskinmeistari í 1974, og øll árini hevur tað verið ein trupulleiki at fáa spilloljuna upp, og at halda oljuinnihaldið í lensivatninum niðri undir lógarkravdu 15 ppm – til fyri trimum mánaðum síðani, tá vit fingu hesa skipanina umborð á Jupiter. Nú verður oljan skild frá vatninun og beind í spilloljutangan,og vatnið fer aftur í lensibrunnin, sigur hann.*

*Eftir Ingolf S. Olsen*

– Hetta man vera tann størsta nýskapanin á hesum økinum, sum er komin fram tey skjótt 40 árini, eg havi siglt sum maskinmaður.

So avgjørdur er Joen Jacob á Fløtunum, maskinstjóri á uppsjóvarskipinum Jupiter, sum fyri trimum mánaðum síðani fingu spilloljureinsiskipanina hjá Green IQ ísetta.

Og Joen Jacob kann um nakar tosa út frá egnum royndum, tí síðani hann tók maskinmeistaraprógvið í 1973, hevur hann siglt bæði í farmaflotanum, við gomlu Norrønu og fiskiskipum. Longsta tørnið hevur hann tikið hjá Kosan Tankers, har hann við onkrum stuttum steðgi sigldi sum meistari og maskinstjóri frá 1974 til 2002. Seinastu átta árini hevur hann verið maskinstjóri umborð á uppsjóvarskipinum Jupiter.

– Tað hevur altíð verið ein trupulleiki at sleppa av við spilloljuna,



*Bogi Jacobsen, maskinstjóri, og Peter Leon Lorenzen, 1. meistari, eru fegnir um nýggju reinsiskipanina umborð á Fagrabergi. – Pengar eru eisini at spara við skipanini. Fyrr var so nógv vatn í spilloljuni, at spilloljutangin beinanvegin fyltist, og tí mátti tømast í heilum. Tað kostar. Nú kunnu vit koyra innihaldið í spilloljutanganum gjøgnum settlaratangan, so alt vatnið verður skilt frá. Tí er ikki neyðugt at tøma spilloljutangan so ofta, sigur Peter Leon.*

sum rennur niður í kjølin, og nógvir hundakunstir eru royndir fyri at gera tað lættari. Men henda skipanin er tann einasta, eg havi sæð og roynt, sum virkar, sigur Joen Jacob.

Tá hann byrjaði at sigla sum maskinmeistari, vóru reglurnar ikki so strangar sum í dag. Og javnan hava søgur verið frammi um, at skip koyra ymiskt á vestfallið, sum ikki eigur at sleppast í havið.

## LÆTTARI ENN AT DÁLKA

– Tað kenni eg nú onki til, men hugburðurin til umhvørvið er generelt ein heilt annar í dag. Tá amboðini at rudda upp við so eisini gerast betri, so verður tað tilsvarandi minni lokkandi at leypa um garðin, har hann er lægstur. Og við hesi reinsiskipanini er tað nógv lættari at taka spilloljuna upp og fáa hana í spilloljutangan enn at gera nakað sum helst annað við hana, slær Joen Jacob fast.

– Tað er sjálvsagt eisini deiligt, at tað nú er vorðið so nógv lættari at fáa spilloljuna upp og goyma hana eftir fyriskrivaðu reglunum, men tað hevur sanniliga eisini týdning fyri trygdina. Tí tá tað er torført at fáa spilloljuna upp, verður eisini meira av henni liggjandi í kjølinum, og tað økir um eldsvandan. Við hesi skipanini, sum vit alt eftir tørvi kunnu koyra manuelt ella tíðarinnstillað, verður kjølurin alla tíðina hildin lens fyri spilloljur, leggur hann afturat.

## UMBORÐ Á FAGRABERGI

Eisini Peter Leon Lorenzen, 1. meistari við uppsjóvarskipinum Fagrabergi, er stórliga fegin um nýggju reinsiskipanina. Teir fingu skipanina umborð fyri tveimum mánaðum síðani.

– Vit eru stórliga bilsnir av, hvussu væl tað riggar. Gaman í høvdu vit sæð tað í drift í kjallaranum hjá Jóhann Fagraklett í Kollafirði, men eitt er, at tað riggar á einum sløttum kjallaragólvi, eitt annað er, um tað riggar í rulli umborð. Og tað ger tað – í veruleikanum riggar tað betri í rulli, tí oljan tá vaskar runt á vatnskorpuni so hon betri rennur niður í pumpuinntakið, sigur hann.

Lógin fyriskrivar, at oljuinnihaldið í lensivatninum skal verða niðanfyri 15 ppm (15 milliónapartar), tá tað verður pumpað í havið. Í royndum, sum eru tiknar av vatninum, ið kemur úr separasjónstanganum (settlingstanganum), í reinsiskipanini hjá Green IQ, hevur oljuinnihaldið verið so lítið, at tað nærum ikki hevur kunnað mátast.

Hetta kann Peter Leon váttað, tó at hann hevur nýtt ein annan hátt at máta oljuinnihaldið: – Eg havi roynt at drukkið vatnið úr separasjónstanganum, og tað er púra reint, sigur hann.

**Við hesi reinsiskipanini er tað nógv lættari at taka spilloljuna upp og fáa hana í spilloljutangan enn at gera nakað sum helst annað við hana**

# 17 maskinistar prógv á Vinnuháskúlanum



Fríggjadagin 17. februar 2012 fingu 17 mans handað maskinistprógv á Vinnuháskúlanum. Fitt av fólki var komið saman til hátíðarhaldið, tá ið prógvini vóru handað. Tað er altíð hugnaligt á Vinnuháskúlanum, tá ið prógv verða handað, røður verða hildnar og felagssangur verður sungin.

Gestarøðari til hátíðarhaldið var Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum.

**Teir, sum fingu prógv handað vóru:**
Allan Jacobsen, Berint Andreasen, Dan Heðin Eli Poulsen, Jan Venned, Jens Jákup Hansen, Kaj Klæmint Suni Olsen, Kenneth Winther Olsen, Kjartan Johannesen, Ólavur Zachariasen, Petur Ove Vesturtún, Sámal Gunnarsson, Steinar Strøm Sævarsson, Thomas Petur Askham, Tórbjørn Poulsen, Jónas Johannesen, Niels Jákup Nielsen og Merwyn Salberg Thomsen.

**Hesar virðislønir vóru lætnar:**
Petur Ove Vesturtún, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum.
Jens Jákup Hansen, kikari frá Eik Banka.
Niels Jákup Nielsen, barometur og klokku frá Trygd.

GESTARØÐARI

# Páll Hansen



Góðu tit, sum lokið hava prógv í dag, hjartaliga tillukku. Tað sama ynski eg tykkara nærmastu, sum komin eru saman at vísa tykkum heiður.

Søgan um maskinistar er ein sera áhugaverd og long søga, hon byrjar longu, tá ferð kom á at seta dampmaskinur í handilsskip í seinnu helt av 1800- talinum, so orðið maskinistur hevur eina sera langa tradisjón .

Haldi meg vita, at longu í 1847 bleiv fyrsta maskinistfelagið stovnað í Norðanlondum. Hettar var áðrenn ferð var komin á, at setta dampmaskinur í skip. Hesir maskinistar koyrdu tok uppi í teimum finsku skógunum, teir fraktaðu timbur.

Elsta fakfelag fyri maskinistar og maskinmeistarar í Norðanlondum í dag er eisini í Finnlandi. Tað felagið var stovnað fyri umleið 160 árum síðani.

Tað finnast eisini maskinistar, sum hava skrivað seg inní heimssøguna.

Ein tann kendasti man vera Henry Ford, sum lærdi til maskinist frá 1889 til 1892.

Venda vit okkum heim á klettarnar vita vit, at longu í 1912-1913 vóru skeið fyri motorpassarar hildin í Føroyum. Men vit skulu heilt fram til 1929, áðrenn farið verður undir skipaða útbúgving fyri motormenn og maskinistar á Føroya Sjómansskúla.

Í 1932 verður Føroya Motorpassarafelag stovnað, og í 1941 Føroya Maskinistfelag. Hetta felag fekk seinni navnið Maskinmeistarafelagið.

Haldi at man kann siga, at maskinistar – hava verið – og eru grundstamman í maskinrúminum á føroyska fiskiskipum. Hetta sama er galdandi fyri farmaskipini upp til 3000 KW.

At verða maskinist og einameistari umborð á skipi er meira krevjandi enn fólk flest geva sær far um. Tá er talan um ein lyklapersón og eitt leiðarastarv umborð. Í hesum sambandi er hóskandi at nevna, at fyrst og fremst skal vaktin haldast, og hon er 24 tímar.

Samskifti við myndugleikar er ein uppgáva. Afturat hesum kunnu vit nevna alt vanligt maskinarbeiði, hydraulisk spøl, kranar, stýringar av ymiskum slag, feilfinning í elinstalatiónum, VVS-arbeiði, synkronisering av ljósmotorum.

Fleiri ymisk pumpusløg eru eisini at hava eyguni við, og eg kundi hildið áfram.

Skulu vit taka samanum kunnu vit siga, at ábyrgdarøki er um alt skipið og er ikki avmarkað til maskinrúmi.

Maskinisturin, sum er einameistari man verða tann persónurin umborð, sum hevur nógv flestar uppgávur.

Okkara fyrrverandi mentamálaráðharri Helena Dam á Neystabø boðaði frá fyri umleið tveimum árum síðani, at maskinistútbúgvingin skuldi flytast av Vinnuháskúlanum til Klaksvíkar á sumri 2012.

Bjørn Kalsø, sum nú hevur mentamál um hendi hevur útsett dagin til august 2013.

Maskinistúbúgving hevur fyrr verðið í Klaksvík, og har eru eisini dugnaligir lærarar, sum kunnu taka sær av útbúgvingini. So har er ongin trupulleiki.

Maskinmeistarafelagið sær maskinistútbúgvingina sum eina útbúgving, ið eigur at mennast og styrkjast. Og vit vóna at Mentamálaráðið eisini dugir at síggja tað.

Eg kann at enda nevna nøkur viðurskifti. Rokni til dømis við, at vit fara at síggja fleiri skip í framtíðini við eini drívmegin niðan fyri 3000 KW, skip sum verða drivin Diesel-eletric.

Vit hava í dag 3 diesel-eletric skip niðanfyri 3.000 KW í føroyska flotanum. Eitt er undir projektering, og helst fara fleiri at leggjast afturat.

Samstundis síggja vit alsamt fleiri undantaksloyvi í okkara fiskiflota.

Eg fari at enda, at eg ynskja tykkum góða eydnu á lívsleið tykkara.

# Stór oljusparing við nýggjum róðri

Nýggja róðrið, sum 73 ára gamli skipstimburmaðurin Levi Heinesen í Klaksvík hevur uppfunnið, gevur skipinum so fleiri ferðir betri stýrieginleikar. Hjá eitt nú línu- og garnaskipum merkir tað stóra oljusparing undir fiskiskapi.



*Levi Heinesen dámar væl at leggja kabal. Tá hevur hann gott útsýnið yvir á keiina hjá Antenes, har hann eygleiðir skipini, sum manirera til og frá kei – tað gongur ikki altíð so væl, og tí fekk hann hugskotið til nýggja róðrið.*

*Eftir: Ingolf S. Olsen*

– Hugskotið fekk eg, meðan eg sat við køksborðið og legði kabal. Eg havi jú fingið so góðar stundir til tað, síðani eg fór um pensjónsaldur, flennir 73 ára gamli skipstimburmaðurin Levi Heinesen úr Klaksvík.

Hann hevur funnið upp á nýggja róðrið, sum í eina tíð við sera góðum úrsliti hevur verið roynt umborð á línuskipinum Polarstjørnuni.

## GOTT ÚTSÝNI

Útsýnið er gott, tá Levi leggur kabal. Heimið liggur dygst niðri við sjóvarmálan í Stangaskákinum í Klaksvík, so úr køksvindeyganum sær hann út yvir vágna og havnarlagið. Beint hinumegin vágna liggur keiin hjá Antines.

– Eg havi sitið og eygleitt, hvussu illa tað ofta gongst at manirera til og frá kei hjá skipunum, sum onga síðuskrúvu hava. So fór eg at hugsa um, at tað mátti bera til onkursvegna at brúka skrúvuvatnið at betra um róðurmegina og harvið stýrieginleikarnar hjá skipunum, greiðir Levi frá.

Hugskotið var sera einfalt: Í staðin fyri bara at snara róðurblaðnum, tá skipið skuldi snarast, skuldi alt róðurblaðið eisini kunna førkast eftir einum føstum ási borð úr borði, so tað tók alt ella at kalla alt skrúvuvatnið á seg.

## GOTT HUGSKOT

Sum altíð hjá Levi, so var stutt frá hugsan til gerð. Í verkstaðnum í kjallaranum brúkti hann ein hálvan seinnapart at smíða eitt modell av róðrinum, sum hann hugsaði sær tað, og bað so fyrrverandi grannan, skipsskipasmiðin Kjartan E. Hansen koma at hyggja.

Kjartan rekur sína egnu smiðjufyritøku Mekanor, og hann sá beinanvegin, at hugskotið hjá Levi var framúr gott.

– Hetta er ein skipan, sum fleirfaldar stýringina bara við at skifta róðrið og uttan at nerta nakað inni í skipinum. Tað má sigast at vera kollveltandi, sigur hann.

Longu vikuna eftir tosaði hann við Guttorm Simonsen, táverandi eigaran og skiparan á Polarstjørnuni, um at royna nýggju róðurskipanina umborð á Polarstjørnuni.

## SNARAR SUM KNARVIN

Kjartan kennir væl Guttorm og Polarstjørnuna. Kjartan hevur sjálvur siglt við henni sum maskinmaður, og fyri nøkrum árum síðani gjørdi hann nýggja brúgv á hana. Hann visti eisini alt um, hvussu vánaligir stýrieginleikarnar hjá skipinum vóru.



*Levi Heinesen brúkti ein hálvan seinnapart at smíða eitt modell av róðrinum. Kjartan E. Hansen sá beinanvegin, at hugskotið var framúr gott.*

Guttormur var beinanvegin til dystin fús at brúka Polarstjørnuna sum royndarskip.

Alt hetta var á várið 2009, og síðani hevur Kjartan E. Hansen, ið bert hevur ein svein afturat sær í Mekanor, arbeitt við at menna róðrið og royna at fáa tað klassagóðkent. Í september 2010 var tað so sett á Polarstjørnuna.

– Polarstjørnan er longd tvær ferðir. Róðrið situr rættiliga langt aftanfyri skrúvuna samanborið við onnur skip, og róðurmegin var sera lítil. Til dømis bar ikki til at venda skipinum her á vánni uttan at muga bakka nakrar ferðir. Men hon bleiv sum eitt annað skip at manirera, tá hetta nýggja róðrið varð sett á hana, tað er vist. Nú snarar hon um seg sjálva sum knarvin, og tað er vorðið so nógv lættari at stýra upp, tá drigið verður, sigur Guttormur.

## SPARA OLJU

Nýggja róðrið er eisini umhvørvisliga sæð eitt jaligt nýbrot. Tí nógv økta róðurmegin merkir, at skipið nú brúkar minni olju, tá tað er til fiskiskap.

– Við gamla, vanliga róðrinum máttu vit alla tíðina brúka regulatorin fyri at fáa nóg mikið av róðurkraft, tá vit stýrdu upp. Nú ber til at liggja í tómgongd og so bara brúka umstýringina og stýripinnin fyri at halda skipinum beint. Eg havi ikki neyv tøl fyri tí, men hetta hevur havt eina munandi oljusparing við sær, greiðir Guttormur frá.

Við hjálp frá Íverksetarahúsinum í Klaksvík hava Kjartan og Levi søkt um patent upp á nýggju róðurskipanina.

– Tað er ein drúgv gongd, sum vit fóru undir fyri tveimum árum síðani. Eg eigi eitt sindur í umsóknini, men Levi eigur tað mesta, tí tað er hann, sum hevur uppfunnið tað grundleggjandi í skipanini, sigur Kjartan.

Teir hava fingið boð frá danska patentkontórinum, sum hevur tikið ymiskt burtur úr, sum patent ikki kann fáast upp á. Síðani hevur patentkontórið mælt Levi og Kjartani til at avmarka umsóknina til fýra punktir.

– Tað hava vit gjørt, og tann prosessin er í gongd nú hjá patentmyndugleikunum. Vit vóna, at ein endalig avgerð verður tikin einaferð í heyst, sigur Kjartan.

## KLASSAGÓÐKENNING

Men hann leggur minst líka stóran dent á eina typugóðkenning frá klassanum, sum í hesum føri er Norsk Veritas.

– Mítt mál er at gera eina róðurskipan, sum er viðlíkahaldsfrí í 36 mánaðir, og vit fara ikki undir nakra framleiðslu, fyrr enn vit hava fingið róðrið typugóðkent, slær hann fast.

Róðurskipanin á Polarstjørnuni





*Polarstjørnan á beding vinstrumegin. Sum tað sæst, fjalir róðrið alla skrúvuna, tí alt róðurblaðið verður førkað út í bakborð, tá snarað verður á stýriborð – og øvugt.*

*Høgrumegin eitt vanligt róður, tað er týðuligt, at stórur partur av skrúvuvatninum fer ótarnað afturvið róðrinum.*

hevur eina royndargóðkenning frá Norsk Veritas, sum hevur hildið eitt vakið eyga við, hvussu tað riggar har umborð.

Mekanor hevur júst munnliga fingið at vita frá Norsk Veritas, at endaliga góðkenningin hjá Polarstjørnuni verður í lagi, tá onkrar smávegis rættingar eru gjørdar. Tað verður væntandi leyst og liðugt við tí um ólavsøkuleitið, og so verður farið undir at søkja um eina generella typugóðkenning til støddarbólkin umfatandi skip millum 24 og 45 metrar til longdar.

– Tað er øgiliga ringt at siga, nær tann typugóðkenningin er komin upp á pláss. Vit hava longu stríðst við pappírsarbeiði í tvey ár, so vit vita, at tað kann taka sína tíð. Men vónandi fáa vit hesa typugóðkenningina seinni í ár, sigur Kjartan E. Hansen.

## NEYV NAVIGERING

Hann sigur, at teir á føroyska heimamarknaðinum serliga fokusera upp á línuskip og garnaskip, ið hava fyri neyðini at kunna halda eina neyva posisjón. Hesi skipini eru eisini júst í støddarbólkinum, sum typugóðkenning í fyrsta lagi verður søkt um.

– Tað eru skip, ið dríva fiskarí við faststandandi reiðskapi, har skipið skal manirerast móti bæði streymi og vindi, tá drigið verður. Um róðurmegin ikki er nóg góð, so krevur tað nógv stríð og nógva orku at halda posisjónina yvir reiðskapinum. Tá er nýggja róðurskipanin framúr góð, og tað hava vit longu kunnað prógvað við Polarstjørnuni, sigur hann.

Hóast lítillátaðir so avdúka Levi og Kjartan, at áhugin fyri nýggja róðrinum er stórur bæði her heima og uttanlands.

So mikið stórur, at Mekanor fer ikki einsamøll at kunna nøkta tørvin, um stóri áhugin um eina tíð verður umsettur til bíleggingar.

## EIN PAKKALOYSN

– Tá alt riggar, sum tað skal og typugóðkenningin er fingin til høldar, og vit hava sett nýggj róður á nøkur skip, kunnu vit fara at konsentrera okkum eitt sindur um patentið aftur. Eg hugsi mær, at vit kunnu gera eina pakkaloysn, sum vit so kunnu selja til aðrar at framleiða. Men onki er avgjørt um hatta enn, leggur Kjartan dent á.

Um nýggja róðrið fær tann stóra viðburð og eftirspurning, sum nógv bendir á nú, er sannlíkt, at uppfinnsomu klaksvíkingarnir eisini fara at søkja um typugóðkenning til størri skip.




*- Polarstjørnan stýrdi út av lagi illa, áðrenn nýggja róðrið varð sett á hana, men nú snarar hon sum knarvin, sigur Guttormur Simonsen, fyrrverandi eigari og skipari á Polarstjørnuni.*

# SIGLINGARÆTLAN 2012

FYRI EINSTAKLINGAR

## FINN DAGIN FYRI TÍNI FERÐ Í SIGLINGARÆTLANINI NIÐANFYRI

Vinarliga legg til merkis at dagarnir hava ymiskar litir. Litirnir eyðkenna hvørjum prístíðarskeiði tú ferðast í:

Grøn = Lágárstíð, Orange = Miðárstíð, Blá = Háárstíð.

Um tín út- og heimferð hava ymiskar litir, ferðast tú í blandaðum tíðarskeiði.

### SIGLINGARÆTLAN GALDANDI 01.01-31.03

| | | JANUAR | | | | | FEBRUAR | | | | | MARS | | | | | | ALLAR TÍÐIR ERU LOKALTÍÐIR | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dag | Havn | Dagf. | | | | | Dagf. | | | | | Dagf. | | | | | | Koma | Fráferð |
| LEY | Hirtshals | | 7 | 14 | 21 | 28 | | 4 | 11 | 18 | 25 | | 3 | 10 | 17 | 24 | 31 | 10.00 | 15.00 |
| SU | til sjós | 1 | 8 | 15 | 22 | 29 | | 5 | 12 | 19 | 26 | | 4 | 11 | 18 | 25 | | til sjós | |
| MÁ | Tórshavn | 2 | 9 | 16 | 23 | 30 | | 6 | 13 | 20 | 27 | | 5 | 12 | 19 | 26 | | 05.00 | – |
| TÝ | – | 3 | 10 | 17 | 24 | 31 | | 7 | 14 | 21 | 28 | | 6 | 13 | 20 | 27 | | – | – |
| MI | – | 4 | 11 | 18 | 25 | | 1 | 8 | 15 | 22 | 29 | | 7 | 14 | 21 | 28 | | – | – |
| HÓ | Tórshavn | 5 | 12 | 19 | 26 | | 2 | 9 | 16 | 23 | | 1 | 8 | 15 | 22 | 29 | | – | 21.00 |
| FR | til sjós | 6 | 13 | 20 | 27 | | 3 | 10 | 17 | 24 | | 2 | 9 | 16 | 23 | 30 | | til sjós | |

### SIGLINGARÆTLAN GALDANDI 01.04-15.06

| | | APRÍL | | | | | MAI | | | | | JUNI | | | ALLAR TÍÐIR ERU LOKALTÍÐIR | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dag | Havn | Dagf. | | | | | Dagf. | | | | | Dagf. | | | Koma | Fráferð |
| LEY | Hirtshals | | 7* | 14 | 21 | 28 | | 5* | 12* | 19 | 26 | | 2 | 9 | 10.00 | 15.00 |
| SU | til sjós | 1 | 8 | 15 | 22 | 29 | | 6* | 13 | 20 | 27 | | 3 | 10 | til sjós | |
| MÁ | Tórshavn | 2 | 9 | 16 | 23 | 30 | | 7* | 14 | 21 | 28 | | 4 | 11 | 05.00 | 14.00 |
| TÝ | Seyðisfjörður | 3 | 10 | 17 | 24 | | 1 | 8* | 15 | 22 | 29 | | 5 | 12 | 09.00 | – |
| MI | Seyðisfjörður | 4 | 11 | 18 | 25 | | 2 | 9* | 16 | 23 | 30 | | 6 | 13 | – | 20.00 |
| HÓ | Tórshavn | 5 | 12 | 19 | 26 | | 3 | 10* | 17 | 24 | 31 | | 7 | 14 | 15.00 | 21.00 |
| FR | til sjós | 6 | 13 | 20 | 27 | | 4 | 11* | 18 | 25 | | 1 | 8 | 15 | til sjós | |

NOTUR:
- 7. apríl: Fráf. Hirtshals kl. 18.00.
- 5. mai: Koma Hirtshals kl. 15.00.
- 6. mai: Til sjós.
- 7. mai: Koma Tórshavn kl. 05.00. Fráf. kl. 19.00.
- 8. mai: Koma Kirkwall kl. 10.00. Fráf. kl. 20.00.
- 9. mai: Koma Lerwick kl. 07.00. Fráf. kl. 20.00.
- 10. mai: Koma Tórshavn kl. 11.00. Fráf. kl. 21.00.
- 11. mai: Til sjós.
- 12. mai: Koma Hirtshals kl. 10.00.

### SIGLINGARÆTLAN GALDANDI 16.06-24.08

| | | JUNI | | | JULI | | | | | AUGUST | | | | ALLAR TÍÐIR ERU LOKALTÍÐIR | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dag | Havn | Dagf. | | | Dagf. | | | | | Dagf. | | | | Koma | Fráferð |
| LEY | Hirtshals | 16* | 23 | 30 | | 7 | 14 | 21 | 28 | | 4 | 11 | 18 | 12.30 | 15.30 |
| SU | Tórshavn | 17 | 24 | | 1 | 8 | 15 | 22 | 29 | | 5 | 12 | 19 | 21.30 | 22.30 |
| MÁ | til sjós | 18 | 25 | | 2 | 9 | 16 | 23 | 30 | | 6 | 13 | 20 | til sjós | |
| TÝ | Hirtshals | 19 | 26 | | 3 | 10 | 17 | 24 | 31 | | 7 | 14 | 21 | 07.00 | 09.00 |
| MI | Tórshavn | 20 | 27 | | 4 | 11 | 18 | 25 | | 1 | 8 | 15 | 22 | 15.00 | 15.30 |
| HÓ | Seyðisfjörður | 21 | 28 | | 5 | 12 | 19 | 26 | | 2 | 9 | 16 | 23 | 07.30 | 10.00 |
| FR | Tórshavn | 22 | 29 | | 6 | 13 | 20 | 27 | | 3 | 10 | 17 | 24 | 03.00 | 03.30 |

NOTUR:
- 16. juni: Koma Hirtshals kl. 10.00.

### SIGLINGARÆTLAN GALDANDI 25.08-26.10

| | | AUG. | SEPTEMBER | | | | | OKTOBER | | | | ALLAR TÍÐIR ERU LOKALTÍÐIR | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dag | Havn | Dagf. | Dagf. | | | | | Dagf. | | | | Koma | Fráferð |
| LEY | Hirtshals | 25* | 1 | 8 | 15 | 22 | 29 | | 6 | 13* | 20 | 10.00 | 15.00 |
| SU | til sjós | 26 | 2 | 9 | 16 | 23 | 30 | | 7 | 14 | 21 | til sjós | |
| MÁ | Tórshavn | 27 | 3 | 10 | 17 | 24 | | 1 | 8 | 15 | 22 | 05.00 | 14.00 |
| TÝ | Seyðisfjörður | 28 | 4 | 11 | 18 | 25 | | 2 | 9 | 16 | 23 | 09.00 | – |
| MI | Seyðisfjörður | 29 | 5 | 12 | 19 | 26 | | 3 | 10 | 17 | 24 | – | 20.00 |
| HÓ | Tórshavn | 30 | 6 | 13 | 20 | 27 | | 4 | 11 | 18 | 25 | 15.00 | 21.00 |
| FR | til sjós | 31 | 7 | 14 | 21 | 28 | | 5 | 12 | 19 | 26 | til sjós | |

NOTUR:
- 25. aug.: Koma Hirtshals kl. 12.00. Fráf. kl. 17.00.
- 13. okt.: Fráf. Hirtshals kl. 18.00.

### SIGLINGARÆTLAN GALDANDI 27.10-31.12

| | | OKT. | NOVEMBER | | | | | DESEMBER | | | | | ALLAR TÍÐIR ERU LOKALTÍÐIR | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dag | Havn | Dagf. | Dagf. | | | | | Dagf. | | | | | Koma | Fráferð |
| LEY | Hirtshals | 27 | | 3 | 10 | 17 | 24 | 1 | 8 | 15 | 22* | 29 | 10.00 | 15.00 |
| SU | til sjós | 28 | | 4 | 11 | 18 | 25 | 2 | 9 | 16 | 23 | 30 | til sjós | |
| MÁ | Tórshavn | 29 | | 5 | 12 | 19 | 26 | 3 | 10 | 17 | 24 | 31 | 05.00 | – |
| TÝ | – | 30 | | 6 | 13 | 20 | 27 | 4 | 11 | 18 | 25 | | – | – |
| MI | – | 31 | | 7 | 14 | 21 | 28 | 5 | 12 | 19* | 26 | | – | – |
| HÓ | Tórshavn | | 1 | 8 | 15 | 22 | 29 | 6 | 13 | 20* | 27 | | – | 21.00 |
| FR | til sjós | | 2 | 9 | 16 | 23 | 30 | 7 | 14 | 21* | 28 | | til sjós | |

NOTUR:
- 19. des.: Fráf. Tórshavn kl. 21.00.
- 20. des.: Til sjós.
- 21. des.: Koma Hirtshals kl. 09.00. Fráf. kl. 14.00.
- 22. des.: Koma Tórshavn kl. 23.59.
- 23. des.-2. jan. 2012: EINGIN SIGLING.
- 3. jan. 2012: Fráf. Tórshavn kl. 21.00.

## ONNUR KUNNING

Orsaka av avbjóðandi veðri, kunnu komu- og fráferðarplássini í Føroyum verða broytt frá Tórshavn til Kollafjørð ella Klaksvík. Í Danmark kunnu komu- og fráferðarplássini verða broytt frá Hirtshals til Frederikshavn, Esbjerg ella Hanstholm.

Seinast dagført:
12.01.2012
sí eisini
www.smyrilline.fo

# Andrias Højgaard í Brennideplinum



## ÚTBÚGVING:

Fólkaskúlan tók eg lutvíst í Føroyum og í Hirtshals. Tá vit fluttu heimaftur til Føroyar royndi eg sjólívið og arbeiddi eisini nakað á landi. Fór síðani í Handilsskúla og tók FHS. Eftir lokið FHS prógv royndi eg aftur sjólívið, tað mundi vera eitt gott hálvt ár. Tá hevði eg sett mær fyri at taka navigatørútbúgving á Vinnuháskúlanum. Har byrjaði eg í 2006 og tók skipsføraraprógv í 2009.

## VERANDI STARV:

Dekkari við Eldborg hjá Supply Service.

## BØRN:

Elly Jóna, 1½ ár.

## BESTA BÓK:

Mær dámar væl bøkurnar hjá Jógvan Isaksen. Minnist best „Blíð er summar nátt á Føroyalandi".

Men annars dámar mær væl ein stóran part av tí mest vanliga, sum verður lisið í Føroyum. Stórur partur er upplýsandi lesnaður, mær dámar væl at víðka føroyska sjónarhornið.

## FYRSTI TÚRUR TIL SKIPS:

Tað var við Vestmenningi, vit partrolaðu saman við Fram.

## LONGSTI TÚRUR TIL SKIPS:

Tað var ein túrur við Nærabergi, 2½ mánað, vit landaðu í Írlandi.

## HVØRJUM SKIPUM HEVUR TÚ VERI VIÐ:

Vestmenningur og Fram, partrolarar.
Næraberg, svartkjaftatrolari/surimi.
Atlantic Navigator, svartkjaftatrolari/surimi.
Niclas, troladu á landleiðini.
Vesturfari, troladu á landleiðini.
Saksaberg, nótabátur.
Fjalshamar, partrolari.
Eldborg, PSV.

## STØRSTA AVBJÓÐINGIN HJÁ EINUM NAVIGATØRI Í DAG:

Tað má vera at seta seg inn í allar tær nýggju reglurnar og mannagongdir, sum skulu lúkast. Eisini at fylgja við í øllum tí nýggja tekniska; tað eru altíð nýggir møguleikar, ið taka seg upp.
Eg havi onkuntíð hugsað, at hjá mongum, ið hava verið í vinnuni mesta partin av lívinum man tað mangan kennast tungt. Tað hevur verið ein rúkandi menning síðstu árini.

## FRÍTÍÐARÍTRIV:

Fáist nógv við sjálvboðið arbeiði. Eitt nú í Bjargingarfelagnum, eg havi verið nógv við Bjargingarbátinum LÌV. Tað er gevandi, mær dámar væl at vera við til at bøta um trygdina á sjónum.

## BILUR:

Eg havi ein svartan Mazda 6.

## TELDUR:

Fujitsu Simens og HP. Harumframt eisini eina stationera Noname.

## BESTI SANGUR:

Hmm... – havi ikki bara ein. Lurti nógv eftir tónleiki, og mær dámar sum heild væl tónleik.

## HVAT KANN GLEÐA TEG Í GERANDISDEGNUM:

Tá tað gongur mínum nærmastu væl, og tá ið arbeiði gongur væl. At vera saman við og arbeiða saman við jaligum og dugnaligum fólki – tað hevur nógv at siga.

## HVAT KANN ØSA TEG:

At teir, sum eru valdir at stýra hesum landi taka sær av løttum, og ikki gera sítt besta. Haldi at teir gloyma, at tað vanliga fólkið ikki hevur valt teir í ein sess, sum teir ongantíð skulu reisa seg úr. Teir koyra bara meira og meira á vanliga fólkið í staðin fyri at byrja at spara í egnum rekkjum fyrst.

Tá tað kemur til at geva sær sjálvum samsýningar og feita pensión, tá skunda teir sær at trýsta á Ja-knøttin. Tað kann øsa meg nógv. Eri bangin fyri, at um leiðslan í landinum blívur við at koyra eftir verandi uppskrift, so er onki fólk eftir í Føroyum um 50 ár.

# Skeiðskema 2012



| Nr. | Skeiðnavn | Dagar | DKK | apr. | mai. | jun. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ARPA skeið<br>ARPA AUTOMATIC RADAR PLOTTING AIDS | 4 | 8.900 | | 14 | |
| 2 | GOC (Generelt certifikat sum radiooperatørur) Nýtt<br>GOC GENERAL OPERATOR CERTIFICATE (NEW) | 15 | 14.900 | | | |
| 3 | GOC-endurnýggjan<br>GOC GENERAL OPERATØR CERTIFICATE, RENEWAL OF COURSE | 7 | 7.000 | | 19 | |
| 4 | LRC (Avmarkað radioskeið)<br>LRC LONG RANGE CERTIFICATE | 7 | 8.900 | | | |
| 5 | LRC við Inmarsat<br>LRC LONG RANGE CERTIFICATE, WITH INMARSAT | 8 | 9.950 | | | |
| 6 | Tankers Safety serskeið fyri olju- gas- og kemikaliutangakip<br>TANKERS SAFETY, SPECIAL COURSE FOR OIL-, GAS- AND CHEMICAL TANKERS | 5 | 6.800 | | 29 | |
| 7 | Flutningur av vandamiklum farmi<br>TRANSPORT OF DANGEROUS GOODS IN DRY CARGO SHIPS | 3 | 5.400 | 30 | | |
| 8 | Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra)<br>SUPPLEMENTARY TRAINING IN MEDICAL PROFICIENCY | 4 | 7.500 | 18 | | |
| 9 | Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra). um prógvið er eldri enn 10 ár<br>SUPPLEMENTARY TRAINING IN MEDICAL PROFICIENCY<br>WHEN CERTIFICATE IS OLDER THAN 10 YEARS | 10 | 12.000 | | | |
| 10 | ECDIS (elektroniskt sjókort)<br>COURSE IN ELEKTRONIC CART DISPLAY INDICATION SYSTEM | 4 | 8.900 | | 21 | |
| 11 | Endurnýggjan av vinnubrævi<br>RENEWAL OF MARITIME TRAINING CERTIFICATE | pr. dag | 1.500 | 23 | | |
| 12 | SSO-skeið<br>COURSE FOR SHIP SECURITY OFFICERS | 3 | 5.400 | | | 4 |
| 13 | § 16-skeið<br>WORKING ENVIRONMENT §16-COURSE | 4 | 5.800 | 10 | | 11 |
| 14 | Ketilpassaraskeið. Skeiðið verður 5 fylgjandi fríggjadagar<br>COURSE AS BOLIER TENDER | 5 | 7.500 | | | |
| 15 | Eldsløkking umborð á skipi. STCW A-VI/1-2<br>FIRE FIGHTING ON BOARD SHIPS | 3 | 5.880 | 16 | 7<br>29 | |
| 16 | Endurtøku eldsløkking umborð á skipi. STCW A-VI/1-2<br>REFRESHER COURSE IN FIRE FIGHTING | 1 | 2.990 | 19 | 10 | 1 |
| 17 | Sløkkileiðsla umborð á skipi. STCW A-VI/3<br>ADVANCED FIRE FIGHTING | 2 | 4.275 | | | |
| 18 | Eldsløkking fyri skipsyvirmenn<br>FIRE FIGHTING FOR SHIPS OFFICERS | 5 | 10.160 | | | 4 |
| 19 | Sløkkiliðsfólk uttan sløkkibil. STCW A-VI/1-2 & STCW A-VI/3<br>ADVANCED FIRE FIGHTING FOR SHIPS OFFICERS | 5 | 9.000 | | | |
| 20 | Sløkkiliðsfólk við sløkkibili | 10 | 18.000 | | | |
| 21 | Brunaumsjónarmenn | 7 | | | | |
| 22 | Venjing fyri sløkkilið | 1 | 1.875 | | | |
| 23 | Eldsløkking og bjarging í tunlum | 3 | 7.290 | | | |
| 24 | Grundleggjandi eldsløkking. (Fyri virkir, stovnar og einstaklingar) | 1 | 900 | | | |
| 25 | Grundleggjandi trygdarskeið fyri sjómenn. STCW A-VI/1-1, A-VI/1-3, A-VI/1-4<br>BASIC SAFETY TRAINING (NÚ SUM E-LEARNING, SÍ VH.FO) | 3 | 3000 | 30 | 14 | |
| 26 | Fult trygdarskeið fyri sjómenn. STCW A-VI/1-1,A-VI/1-2, A-VI/1-3, A-VI/1-4<br>BASIC SAFETY TRAINING | 6 | 10.570 | | | |
| 27 | Bátaføraraskeið. STCW A-VI/2-1<br>PROFICIENSY IN SERVIVAL CRAFT AND RESCUE BOATS | 4 | 4.840 | | | |
| 28 | Medisinsk fyrstahjálp. STCW A-VI/4-1<br>MEDICAL FIRST AID | 4 | 6.180 | | 1 | |
| 29 | Maritime Legislation. e-learning (Sign up on www.vh.fo)<br>FØROYSK SJÓVINNULÓG. E-LEARNING | | 5.000 | | | |

Vinnuháskúlin treytar sær rætt at avlýsa skeið, um ov fá eru tilmeldað.

Nóatún 7 · FO-100 Tórshavn · Tel 350 250 · Faks 350 251 · info@vh.fo · www.vh.fo

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

KREA

# Hevur tú trupuleikar av **olju í kjølinum,** ella við vatni í **slamtanganum,** einum oljuútskiljara **sum ikki koyrir optimalt,** ella olju og feitt sum flýtur **inni á havnalagnum?**



## So er „Greenarc 500" & **„Oljulensarin" frá Green** IQ rætta loysnin.

Hendan skipanin er frá byrjan til enda sera væl gjøgnum hugsa, og gjørd við nøkrum sera áhugaverdum krøvum og ynskjum frá fólkunum handan Green IQ Sp/f.

- Tað skal vera einkult
- Tað skal hava fáar slit deilir
- Tað skal kunna sparast inn aftur í minkandi sápunýtslu og færri slam bila vitjanum
- Tað skal hava eina langa livitíð
- Tað skal ikki kosta so nógv sum aðrar loysnir
- Tað skal vera nemt at seta upp
- Tað skal verða nemmari at brúka, enn at lensa olju á sjógv
- Tað skal passa seg sjálvt, og harvið ikki órógva arbeiðsgongdina umborð
- Tað skal taka lítið pláss og alíkavæl vera effektivt
- Tað skal kunna avdúkað oljulekar í maskinrúminum

At byrja við sá tað út til at vera ein trupuleiki at fáa hetta at rigga og halda seg til øll hesi krøvini.

Eitt sindur av treiskni og knapt 3 ár skuldu til, men nú eru vit loksins komnir á mál.

Ein oljufríður kjølur økir munandi um trygdina umborð, viðvíkjandi eldi!

Ein oljufríður kjølur betrar eisini um arbeiðsumhvørvi umborð, og hetta kann alt fáast uttan stríð og strev, og uttan brúk av sápu.

Royndirnar eru lidnar, Kundanir (eisini reiðarnir) eru sera væl nøgdir og nú byrjar sølan.

Demobussurin fer á turne runt landi komandi mánaðirnar, so nú er at halda seg til. bílegg eina vitjan av okkum, vit bjóða kaffi og eitt gott spilloljuprát aftur við myndum, video, olju/vatnprøvum og demo anlegginum.

Prísurin fyri eitt einkult anlegg uttan montering, er 76000,- kr. + mvg (EXW). Sama anlegg kann súgva frá fleiri oljulensarum ella slamtangum!

Tilmelding og meira info er á www.greeniq.fo

Green IQ

a strong link to a better environment



Jens Naldal, formaður
í Søfartens Ledere

# Sáttmálaloysi í danska handilskipaflotanum

*Eftir: Eyðstein Djurhuus*

Søfartens Ledere hevur síðan 2010 roynt at fáa nýggjan sáttmála fyri navigatørar við Danmarks Rederiforening. Stóra stríðsmálið hevur verið, hvussu skulu navigatørarnir fáa kompensatión fyri skattalækkingarnar, sum komu í Danmark í 2009. Teir sum sigla undir DIS fáa útgoldna eina nettoløn, sum er skattafrí. Siðvenja hevur verið fyri, at broytingar í skattaviðskiftunum skulu síggjast aftur í DIS lønum. Men hesaferð vildu reiðararnir ikki spæla við meira, og tí eru samráðingarnar endaðar uttan nakað úrslit.

## TEIR HÆGSTLØNTU SKULDU FÁA MEST

Broytingarnar í toppskattinum skuldu ført við sær, at teir hægst løntu skuldu havt størst endurgjald fyri tann lækkaða skattin. Útrokningar hava víst, at summir skuldu hava 10 % í lønarhækking. Hetta hildu reiðararnir verða nakað nógv av tí góða, teir hildu fast við, at hýrurnar hjá donskum „senior officerum“ longu nú eru millum heimsins hægstu.

## MASKINMESTERFORENINGEN GJØRT SÁTTMÁLA

Søfartens Ledere og Maskimesterforeningen samráddust leingi saman, tá eitt tilboð endaliga kom frá reiðaranum, sendi leiðslan hjá meistaranum uppskotið til uratkvøðu millum limirnar. Hóast talan var um eina lítla lønarkompensatión uppá 1 %, so varð uppskotið góðtikið av limunum.

## NAVIGATØRARNIR BERJAST VÍÐARI

Uratkvøða hevur ikki verið millum navigatørarnar, men málið hevur fingið nógva umrøðu á limafundum kring alt Danmark. Hetta hevur eisini verið umrøtt á limafundi í Føroyum. Breið semja er um ikki at góðtaka tilboðið frá „reiðaríforeiningini“.

## SNYDT SØMAND !

Søfartens Ledere hevur koyrt eina kampanju um hesi viðskifti. Endamálið hevur verið at kunna almenningin og politisku skipanina um, hvussu reiðarar vilja stjala skattalættan frá sjómonnum. Hetta kann alt lesast á *www.snydtsoemand.dk*

## EITT ÓVANLIGT STIG

Seinasta tiltakið er, at nú hevur fakfelagið stevnt reiðaríunum fyri ólógligan statsstuðul. Longu áðrenn stevningin kom boðaðu reiðararnir frá, at hetta fór at merkja, at allir sáttmálar og DIS-høvuðsavtalan fóru úr gildi.

## ALLIR UPPÁ INDIVIDUELLA AVTALU

Alt bendir á, at hetta stríðið kann gerast drúgt, tí koma allir danskir og føroyskir navigatørar undir DIS í komandi tíðum at mynstra uppá individuella avtalu og ásetingarnar í sjómanslógini.

## LIMAFUNDUR Í HAVN

Søfartens Ledere hevur limafund í hølunum hjá FSN tann 13. juni. Uttan iva fer hetta mál at fáa nógva umrøðu. Eisini hevur nýggja skattingin av pensjónum við inngjaldi givið føroysku limunum hjá Søfartens Ledere høvuðbrýggj, tí enn er ikki heilt greitt um teirra pensjónsskipan hjá PFA-Pension eisini er umfata av nýggju skattareglunum.

# BROT ÚR DAGBÓK

**10. jan. Vestara bryggja**
Vitjað verður umborð á skotska veitingarskipinum VOS Endurance. Skipið, sum bert er eitt ára gamalt, var komið inn á Havnina at skifta manning. Manningin var skotar og polakkar.

**12 jan. Lívstrygging**
Fundur um innkrevjing av gjaldi fyri samlagstryggingina, FSN og MF skulu nú sjálvi fylgja við inngjøldunum.

**16. jan. FSN**
Nevndarfundur, nývalda nevndin heldur sín fyrsta fund.

**18.-20. jan. Strandfaraskipini**
FSN vitjar umborð á øllum strandfaraskipunum til at tosa um sáttmálasamráðingarnar.

**23. jan. FF**
Manningarfeløgini hitta Felagið Nótaskip um at leingja verandi sáttmála.

**26. og 27. jan. Keypmannahavn**
Lívstrygging og Bank Nordik skipa fyri temadøgum um marknaðarrentu fyri fakfeløgum og virkiskundum. Vitja verður hjá fleiri donskum pensiónsfeløgum.

**2. feb. Starvsmannafelagið**
Fakfelagsfundur um stuðulstiltøk tá pedagogarnir eru í verkfalli.

**9. feb. Kaffihúsið**
Skipað verður fyri fundi fyri manningunun á standfaraskipunum um nýggju kunngerðina um hvílitíð. Umleið 30 mans møttu til fundin.

**16. feb. Runavík**
P/F Frakt og Sandsølan og FSN endurnýggja sáttmálan. Broytingarnar eru tær somu sum í sáttmálanum við Reiðarafelagi Fyri Farmaskip.

FSN hevur 16 limir hjá hesum reiðarínum, sum eftir ætlan fær eitt nýtt skip í flotan seinni í summar.

**16. feb. Klaksvík.**
Maritima Útbúgvingarráðið vitjar Klaksvíkar Sjómansskúla og Trygdarmiðstøðina. Tað er sera áhugavert at síggja nýggju framkomnu útgerðina á nýggju Trygdarmiðstøðini.

**16. feb. Toftir**
Nes Kommuna skipar fyri almennum fundi við heitinum Føroyar sum tilfeingisdepil. Orðaskifti var nógv merkt av tí komandi makrelbýtinum. Jógvan L. Gregersen greiddi frá hvørjir møguleikar og vansar, eru við framleiðslu av frystum fiski.

**17. feb. Hotell Føroyar**
Betri Pensjón skipar fyri fundi um framtíðar avbjóðingar á pensjónsøkinum. Broytingin av skatting av pensjónum fekk – sum vera man – nógva umrøðu.

**21. feb. Vinnunevndin**
FSN greiðir frá okkara áskoðan um lógaruppskot um tvungna loðskyldu

**27. feb. Fiskivinnuráðið**
Til ummælis er nýggj kunngerð um tiltøk til vernd av ungfiski. FSN hevur ta áskoðan, at tá stór øki eru permanent friða fyri at verja ungfisk, so man tað ikki bila um nakað verður veitt av ungfiski á øðrum leiðum.

**1. mar. Fíggjarmálaráðið**
Sáttmálasamráðingar fyri SSL.

**2. mar. Norðurlandahúsið**
Andstøðuflokkarnir skipa fyri tiltakið undir heitinum Fólksins Ogn. Nógvir áhugaverdir fyrilestrar vóru um, hvussu frægast er at umsita fiskirættindini.

**6. mar. Fuglafjørður**
Sáttmálin millum FSN og P/F Sandgrevstur verður endurnýggjaður. Sandgrevstur hevur 3 skip, og FSN hevur 4 limir við hvørjum skipi.

**7. mar. Trygdargrunnurin**
Stýrið viðger uppskot um at hækka inntøkutrygdina og at lækka avreiðingarkravið hjá útróðrarmonnum fyri at sleppa uppí skipanina

**12. mar. Tvøroyri**
FSN og MF vitja hjá SSL á Tvøroyri. Stovnurin greiðir frá, hvussu nýggju reglurnar um hvíld, kunnu yvirhaldast við galdandi ferðaætlan.

**22. mar Innlendismálaráðið**
Manningarfeløgini hitta Kára P. Højgaard, um hvussu ásetingarnar um arbeiðs- og uppihaldsloyvi hjá útlendingum við føroyskum fiskiskipum verða umsitin. Eftir ætlan verður útlendingaøkið yvirtikið í 2013, tá fer at verða lættari at innføra greiðari reglur á hesum øki. Landstýrismaðurin gav okkum rætt í, at tað er eitt hol í lóggávuni, tá til ber at taka manning

úr fjareystri umborð á føroysk fiskiskip uttan arbeiðs- og uppihaldsloyvi bert tí skipi fiskar uttan fyri 12 fjórðingar. Ein annar møguleiki er at seta treytir í fiskiloyvi hjá skipinum um manningar og lønarviðskifti. Føroysku manningarfeløgini hava einki ímóti útlendskum fiskimonnum, so leingi teir ikki dumpa føroysku sáttmálarnar.

**22. mar. Lívstrygging**
LÍV kunnar fakfeløgini nú Bank Nordik hevur slept ætlanini at keypa helvtina av LÍV.

**28. mar. Vinnuháskúlin.**
Formaðurin greiðir skiparaflokkinum frá um sáttmálan fyri fiskiskip. Eisini varð nógv tosað um ymisk arbeiðsmarknarmál.

**3. apr. Lønardeildin**
Samráðingarfundur um SSL. Tosað varð um, hvussu arbeiðstíðin í sáttmálanum kann fáast at samsvara við MLC sáttmálan. Eftir nógvar fundir tykist nú at vera møguligt at tosa um hetta.

**11. apr. Starvsmannafelagið**
Fakfeløg hittast um hvør framtíðin hjá LÍV skal verða.

**13. apr. MF**
Faroese Maritime Union hittist til at fyrireika vitjan frá ITF í Føroyum í mai mánað.

# Hvør skal gjalda tilfeingisgjald?



*Eyðstein Djurhuus, formaður felagsins*

Nýggja gandaorðið innan føroyskan fiskivinnupolitikk er tilfeingisgjald. Sagt verður at hetta fer at steðga spekulatión við fiskiloyvum, og fer at gera vinnuna burðardygga eftir fáum árum.

Landið kann saktans áleggja eitt trivaligt avgjald á, tá skip, loyvir ella reiðarí verða handla. Soleiðis ber til at fáa ein munandi part av køkuni, tá spekulerað verður við fólksins ogn.

Teir tankar, sum higartil hava verið frammi um tilfeingisgjald, hava lagt størsta týdningin í at fáa fleiri inntøkur til ein svangan landskassa.

Tilfeingisgjøld verða vanliga áløgd vinnum, sum gagnnýta eitt avmarka náttúruríkidømi, tá hesar vinnur geva óvanliga høgan vinning.

Í føroyskum fiskiskapi er tað bert pelagiska vinnan, sum kann vísa á nakað nevnivert av vinningi. Allur okkara feskfiskafloti hevur í mong ár havt stórt hall, so har er nokk ikki nógv at fara eftir.

Enn vita vit ikki, hvussu gjaldið verður ásett. Okkurt bendir á at talan verður um eitt slag av avgjaldi á allan fiskiskap. Hetta verður eisini tvinna saman við ræðisrættinum yvir loyvinum. Eftir øllum at døma fáa skipaeigarar ognarrættin í eitt ávíst áramál ímóti at gjalda tilfeingisgjald.

Í okkara sáttmála er keyp av fiskirættindum ikki loyvd felagsútreiðsla, men avgjøld kunnu dragast frá áðrenn manningin fær sín part. Soleiðis kann væl hugsast at fiskimaðurin nú kemur at gjalda fyri at steðga spekulatiónini í vinnuni. Tann ovasti parturin av oljuútreiðslunum gjørdist ein felagsútreiðsla við seinastu sáttmálasamráðing. Hetta hevur kostað fiskimanninum nógv, nú oljuprísurin er nógv hækkaður, samstundis sum fiskiskapurin hevur verið svikaligur.

Tí er tað lítið hugaligt at vita, at vit allarhelst fáa eina felagsútreiðslu aftrat á avrokningina. Tað verður nokk torført at krevja meira frá reiðaranum, tí hann fær eisini minni í sín part orsaka av tilfeingisgjaldinum.

Okkara tilmæli er, latið tað verða ókeypis at fiska og leggi heldur avgjald á sølu av fiskiloyvum.

# BROT ÚR DAGBÓK

**10-01-2012: FSN**
Blaðfundur nr. 45: Fundur um blað nr. 13.

**11-01-2012: MF**
Fundur millum SSL og MF har SSL legði nýggjar vaktarætlanir og arbeiðsseðil fram fyri felagið til ummælis nú nýggjar hvíldarreglur koma í gildi.

**11-01-2012.Starvsmannafelagið**
Fundur við Fakfelagssamstarvið og umboð fyri almennu fakfeløgini.

MF svaraði uppá tey teir spurningar, sum hini feløgini máttu hava eftir at MF hevði gjørt sáttmála.

**13-01-2012: Inntøkutrygd**
Hetta var fyrsti fundur í hesum árininum, og snúði hann seg serliga um møguligar broytingar í skipanini við inntøkutrygd, her undir dagføringar av útgjøldum og treytirnar hjá útróðrarmonnum.

**20-01-2011: Nevndarfundur**
14 mál á skránni, millum annað eftirmeting av semju við FMR/KAF. Støðutakan til umsókn frá Sjósøkið, oljunýtsla hjá fiskiskipum og nøkur persónsmál.

**25-01-2012: Hotel Hafnia**
Fundur við Fleet Manager hjá Polar Seafood Danmark.

Snúði seg um at taka ein dialog um framtíðar samstarv millum partarnar

**26 og 27-01-2012: Evnisdagar í Keypmannahavn**
Endamálið við hesari kunningarferð var at fáa innlit í, hví donsku eftirlønarfeløgini hava lagt um til marknaðarrentu. Vit vitjaðu hjá PFA, AP-Pension og Industriens Pension og hoyrdu teirra grundgevingar og settu teimum spurningar.

Samanumtikið ein góður og upplýsandi túrur.

**09-02-2012: Kaffihúsið**
Hetta var fundur fyri manningar hjá SSL, sum MF, FSN og Starvsmannafelagið høvdu boðið limunum til.

Á skránni varð nýggja vaktarætlanin nú MLC ferð at koma í gildið o.a.

**20-02-2012: FSN**
Blaðfundur: Mið og Magn. Eftirmeting av blaðið nr. 12 og innihald til útgávu av blað nr. 13.

**24-02-2012: MF, nevndarfundur**
15 mál á skránni, m.a. uppsøgn av sáttmála við FAG. Heimasíðan, komandi formaður og roknskapur, eisini var alkoholpolitikkur til umrøðu.

**05-03-2012: FSN**
Blaðfundur Mið og Magn. Tosað bleiv um greinar til komandi blað.

**09-03-2012: MF, nevndarfundur**
12 mál á skránni, eftirmeting av aðalfundinum, val av næstformanni og býti av økjum.

**12-03-2012: Tvøroyri**
Fundur við leiðsluna hjá SSL um tær nýggju hvíldarreglurnar, sum ætlanin er at setta í gildi.

**16-03-2012: ALS-húsið**
Fundur í Trygdargrunni Fiskivinnurnar, um møguligar broytingar í útgjaldinum.

**21-03-2012: FF**
Fundur við P/F Hvalnes, Norðborg, um framleingjan av avtalu. Semja var millum partarnar at framleingja avtalu til komandi ár.

**22-03-2012: Innlendismálaráðið**
Manningarfeløgini fund við Kára P. Højgaard um útlendingar við føroyskum fiskiskipum.

**22-03-2012: FF**
Fundur í FMU um komandi vitjan hjá ITF.

**22-03-2012: LÍV**
Fundur millum 10 tey størstu fakfeløgini og LÍV nú BankNordik hevur boðað frá, at teir ikki eru við í LÍV.

**23-03-2012: Sjóvinnustýrið**
Fundur um aktuell mál og komandi vitjan hjá ITF.

**23-03-2012: FSN**
Síðstu fyrireikingarnar til komandi MIÐ & MAGN, blað nr. 13.

**30-03-2012: MF**
Vanligur nevndarfundur. 4 mál á skránni og serlig viðgerð av støðuni í LÍV.

# Formaðurin í heiltíðarstarvi

**Á AÐALFUNDI Í MASKINMEISTARAFELAGNUM Í 2011 VARÐ SAMTYKT, AT FORMAÐURIN, SUM VALDUR VAR Á REGLULIGA AÐALFUNDI FELAGSINS Í 2012 SKULDI RØKJA FORMANSSTARVIÐ SUM HEILTÍÐARSTARV.**



Í blaðnum hesaferð er greitt frá aðalfundi felagsins, sum varð hildin á Hotel Hafnia 3. mars 2012. Á hesum fundi var Páll Hansen valdur til formann í Maskinmeistarafelagnum, og gjørdist hann sostatt fyrsti formaður felagsins, sum skal røkja starvið sum heiltíðarstarv. Páll hevði sín fyrsta arbeiðsdag í nýggja starvinum 1. apríl.

Páll hevur arbeitt sum maskinmeistari á Sundsverkinum í 38 ár.

Í sambandi við, at Páll varð valdur at røkja formansstarvið sum heiltíðarstarv hevur hann fingið farloyvi frá SEV.



29. mars var Mið & Magn á Sundsverkinum og tók nakrar myndir av starvsfeløgunum hjá Páll á Sundi. Í sambandi við vaktarskiftið frá SEV til Maskinmeistarafelagið bjóðaði Páll – henda morgunin – starvsfólkunum á Sundsverkinum morgunbreyð.

FØÐINGARDAGAR

# Skipara- og Navigatørfelagið og Maskinmeistarafelagið

## SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAGIÐ: FØÐINGARDAGAR

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Ranghamar | 28. mai 1942 | 70 ár |
| Andreas Djurhuus | 16. juni 1942 | 70 ár |
| Andrew Svenning Borg | 01. apríl 1952 | 60 ár |
| Kristian Julius Jacobsen | 12. apríl 1952 | 60 ár |
| Jógvan Páll Poulsen | 13. apríl 1952 | 60 ár |
| Bent Kristensen | 24. apríl 1952 | 60 ár |
| Jónleif Láberg | 28. apríl 1952 | 60 ár |
| Eyjohn Sivertsen | 01. mai 1952 | 60 ár |
| Poli Mikkelsen | 02. mai 1952 | 60 ár |
| Birgir Sivertsen | 07. mai 1952 | 60 ár |
| Karl Olgar Joensen | 17. mai 191952 | 60 ár |
| Finn Clementsen | 20. mai 1952 | 60 ár |
| Poul Johannes Simonsen | 05. juni 1952 | 60 ár |
| Niels J. Hentze | 15. juni 1952 | 60 ár |
| Egil E. Toftegaard | 21. juni 1952 | 60 ár |
| Hans Magnussen | 09. apríl 1962 | 50 ár |
| Emil Nolsøe | 17. apríl 1962 | 50 ár |
| Magnus Joensen | 26. apríl 1962 | 50 ár |
| Símun Johannus Nybo | 02. apríl 1972 | 40 ár |
| Hallur Dahl | 26. apríl 1972 | 40 ár |
| Sigurd Joensen | 06. mai 1972 | 40 ár |
| Karsten Nattestad Jespersen | 10. mai 1972 | 40 ár |
| Símun H. Johannesen | 23. mai 1972 | 40 ár |
| Jóhan Lydersen | 30. mai 1972 | 40 ár |
| Tóroddur Niclasen | 07. juni 1972 | 40 ár |
| Jóhan W. Lognberg | 08. juni 1972 | 40 ár |
| Jan Here Simonsen | 18. juni 1972 | 40 ár |
| Jón Heðin Jørgensen | 24. juni 1972 | 40 ár |

## MASKINMEISTARAFELAGIÐ: FØÐINGARDAGAR

| | | |
|---|---|---|
| Tummas Thomsen | 20. apríl 1942 | 70 ár |
| Kristian Dalsenni | 4. apríl 1952 | 60 ár |
| Jørgen Poulsen | 5. mai 1952 | 60 ár |
| Símun Dahl | 18. mai 1952 | 60 ár |
| Jallgrím Jacobsen | 26. mai 1952 | 60 ár |
| Egil Dalsgaard | 15. juni 1952 | 60 ár |
| Joen Jacob Johansen | 23. juni 1952 | 60 ár |
| Høgni Sámal Joensen | 5. apríl 1962 | 50 ár |
| Jóanes Joensen | 5. apríl 1962 | 50 ár |
| Atli Liliendahl Hansen | 29. apríl 1962 | 50 ár |
| Torkil Strøm | 7. mai 1962 | 50 ár |
| Jack Toftegaard | 19. mai 1962 | 50 ár |
| Kári Mikkelsen | 25. mai 1962 | 50 ár |
| Tórbjørn Sæbúð | 24. juni 1962 | 50 ár |
| Høgni á Borg Gaard | 18. mai 1972 | 40 ár |
| Høgni Hammerfoss | 18. mai 1972 | 40 ár |
| Leif Klein | 11. juni 1972 | 40 ár |
| Gert Norðoy | 11. juni 1972 | 40 ár |

# Jóhannus Jacobsen farin

Nevndarlimur okkara Jóhannus Jacobsen av Viðareiði, doyði av hjartatilburði týsdagin 3. apríl. Hann var 56 ára gamal, og hevur verið nevndarlimur í Føroya Skipara- og Navigatørfelag í 15 ár.



## Ein gløggur eygleiðari og dugnaligur skipari

Jóhannus var ikki tann, sum rópti harðast undir samráðingum. Leiklutur hansara var at eygleiða og síðan at koma við teimum skilagóðu viðmerkingunum. Hesin leikluturin er sera týdningarmikil í einum fakfelag, tí annars er skjótt at fara av kósini og missa stavnhaldið.

Seinastu árini hevur Jóhannus siglt við alifiski við brunnbátinum Grønulíð. Hóast arbeiðstíðirnar og veðri kundu vera ólagaligt so dámdi honum sera væl hetta arbeiði. Jóhannus førdi og átti í mong ár trolbátin Fiskaklett. Tað er ikki ov nógv sagt um vit siga, at hann var ein tann royndasti skiparin innan trolveiðu á innaru leiðunum.

Jóhannus var í fleiri ár okkara umboð í Fiskivinnuráðnum, sum ger tilmæli um allar kunngerðir og lógarbroytingar á fiskivinnuøkinum. Hetta starv røkti hann við sama nærlagni, sum hann vísti í øllum øðrum viðurskiftum. Hansara áskoðan um dagliga arbeiði í FSN, var at ongin limur skuldi missa nakran ágóða orsaka av, passiviteti hjá fakfelagnum. Hetta er ein sera sunn og vís meginregla hjá einum fakfelag at virka eftir.

Saknurin eftir Jóhannusi verður stórur hjá nevnd og starvsfólkum í FSN. Hann møtti altið væl upp til fundirnar og hann kom javnan inná gólvi á skrivstovuni, tá hann hevði ørindi í Havn.

Vit vilja vísa okkara djúpastu samkenslu við konu og børnum, sum hava verið fyri einum so stórum missi. Okkara ynski er, at tit finna ta troyst og tann ugga, sum tykkum tørvar í sorgini.

*Nevnd og Starvsfólk í*
*Føroya Skipara- og Navigatørfelag*

# Trygd skal vera ein sjálvfylgja

Høvuðsuppgávan hjá 32 ára gamla Sámali Sivertsen er at byggja upp eina mentan, har trygd er ein sjálvsagdur partur av arbeiðnum. Hann hevur verið við frá byrjan, síðani Supply Service strekti kjølin á Eldborg, til ambitiøsa reiðaríið í frálandavinnuni í dag stendur á gáttini til at taka ímóti fjórða nýbygninginum

*Eftir: Jón Brian Hvidtfeldt*

–Vit hava havt *ein* arbeiðsskaða umborð, síðani vit byrjaðu fyri trimum árum síðani.

Álvarsemi liggur í orðunum, men tó ikki nakað reyp. Tí trygd er ikki nakað at reypa við – trygdin verður gjørd upp í turrum tølum í neyvum statistikki, ið aftur er ein fortreyt fyri yvirhøvur at koma uppí part í beinhørðu frálandavinnuni.

Sámal Sivertsen er tað, ið á enskum fakmáli nevnist HSEQ & Crew Manager. Á meira vanligum føroyskum merkir tað, at hann hevur ábyrgdina av øllum, ið hevur við trygd, umhvørvi, heilsu og góðskutrygging at gera. 32 ára gamli klaksvíkingurin við bústaði í Hoyvík hevur verið við, síðani Supply Service skuldi manna fyrsta nýbygningin, Eldborg. Hann er útbúgvin skipsførari, og vóru tað fyrst og fremst royndirnar úr frálandavinnuni, bæði við donskum og norskum reiðaríi, sum í 2008 førdu hann til eitt starv hjá ambitiøsa reiðarínum í Leirvík.

–Høvuðsuppgávan var og er framvegis at byggja upp eina mentan, har trygd er ein sjálvfylgja. Eina safety-mentan, trygdarmentan, ið gongur gjøgnum alt reiðaríið og sum øll kenna seg aftur í, leggur Sámal Sivertsen afturat.

## BYGGIR VARÐAR

Fyrsta uppgávan hjá Sámali Sivertsen í starvi fyri Supply Service var at fyrireika reiðaríið til at taka ímóti spildurnýggju Eldborg árið eftir, tað var í juni 2009. At kalla ongar fastar mannagongdir vóru fyri tey arbeiði, ið verða gjørd umborð. Talan var jú um eitt spildurnýtt skip hjá einum nýggjum reiðaríi í nýggjari vinnu. Tá Eldborg kom í vinnu vóru knapt 200 mannagongdir orðaðar og niðurskrivaðar, og fleiri leggjast afturat. Talan er um alt frá operationellum procedurum til kekklistar til reglusett av ymsum slag. Allar mannagongdir eru savnaðar á databasum, ið eru lætt atkomiligir hjá manningini á øllum teldum umborð.

Sámal Sivertsen slær upp eina trygdartabell fyri mannagongdir, um ein dekkari skal upp í eina mastur at arbeiða. Ketildrakt, trygdarskógvar, trygdarhjálm, arbeiðshandskar, reim at binda mannin



*Sámal Siviertsen,*
*HSEQ & Crew Manager*

fastan, trygdarbrillur til vernd av eygunum (sjálvboðið, men verður tó tilmælt) og bjargingarvest, um arbeiðið viðførir vanda fyri at arbeiða omanfyri sjógv. Ein yvirmaður umborð skal geva loyvi til at arbeiðið í mastrini kann gerast, og hann krossar av í trygdartabellini.

–Jú, hetta kann óivað tykjast eitt sindur tvørligt, men soleiðis eru mannagongdirnar og í síðsta enda snýr tað seg jú um trygdina hjá manningini. At vit ikki skulu hava nakran arbeiðsskaða umborð, sigur Sámal Sivertsen og vendir aftur til statistikkin yvir arbeiðsskaðarnar.

Einasti arbeiðsskaði hjá Supply Service higartil var, tá ein maður skar seg og fekk tvær pentur í hondina. Lækni kom uppí og veitti medisinska hjálp, og óhappið varð skrásett og fráboðað kundunum hjá reiðarínum.

Herfyri fekk manningin á Eldborg heiðurin Ársins Fyrstahjálpari fyri at hava borið skjótt at, tá ein av manningini í august í fjør fekk ein hjartatilburð. Hjartastartari var umborð, og manningin fekk lív í aftur mannin.

–Eisini tann hendingin varð sjálvandi skrásett og fráboðað okkara kundum, ið tó ikki mettu hann sum arbeiðsskaða. Talan var um ein hjartatilburð, sum í princippinum kundi rakt mannin, hvar hann so enn var. Tí er hesin annars álvarsami tilburður ikki ein arbeiðsskaði, greiðir Sámal Sivertsen frá.

Hóast 200 niðurskrivaðar mannagongdir ljóðar av nógvum, so er tað, sambært Sámali Sivertsen, eitt lágt tal sammett við onnur reiðarí við drúgvari royndum í frálandavinnuni. Men niðurskrivaðu mannagongdirnar gerast støðugt fleiri, tí tað er eitt krav frá myndugleikunum, kundunum og reiðarínum at allar uppgávur skulu verða lýstar skrivliga. Og vágameting skal skrivast í samband við allar nýggjar uppgávur umborð.

Somuleiðis skulu allir tilburðir ella støður, sum á onkran hátt kunnu ávirka trygdina umborð, skrásetast og fráboðast reiðarínum, sum sendir fráboðanina víðari til kundan, tað vil siga oljufelagið.

–Ein tummilfingurregul í vinnuni sigur eina rapportering pr mann pr túr. Fyri okkara skip gevur tað 12 rapporteringar um mánaðin, og hevur hetta víst seg at halda rímuliga væl, sigur Sámal Sivertsen og sipar til tær millum 150 og 200 rapporteringarnar frá Eldborg í fjør.

Fráboðanirnar eru stuttar og neyvar, men fevna um alskins viðurskifti umborð. Alt frá at kokkurin missir eina grýtu við kókandi vatni ella ein maður ikki brúkar røttu verndarútgerð, til at ein havnaarbeiðari hevur gjørt sær ein túr uppá eina bingju á dekkinum uttan neyðugu loyvini frá yvirmanni umborð, meðan skipið liggur við bryggju.

–Sjálvandi eru onkrar stuttligar rapporteringar ímillum, um viðurskifti sum onkur kanska heldur vera tvætl. Men hetta er partur av gerandisdegnum, og partur av at manningin alla tíðina má vera 100 prosent tilvitað um trygdina,

## TRYGDIN EIN TREYT

Trygdarmentanin, ið Supply Service roynir at byggja upp, hevur

*-Høvuðsuppgávan var og er framvegis at byggja upp eina mentan, har trygd er ein sjálvfylgja. Eina trygdarmentan, ið gongur gjøgnum alt reiðaríið og sum øll kenna seg aftur í*



*Jon Slinde, leiðari fyri sjódeildina hjá Statoil (í miðjuni), á hátíðarhaldi í Bergen, tá Jens Meinhard Rasmussen og hini í Supply Service tóku ímóti Sjóborg. Mynd: Jan Múller*

ikki bara týdning fyri lív og heilsu hjá manningini umborð. Hon er eisini ein avgerandi faktorur fyri, um føroyska reiðaríið yvirhøvur sleppur uppí part at veita tænastu til størstu, bestu og harvið eisini mest áhugaverdu kundarnar.

–Á einari av skrivstovunum hjá Statoil hongur ein stórur skermur við trimum lyklatølum fyri teirra fyritøku. Ovasta lyklatalið er talið av arbeiðsskaðum pr millión arbeiðstímar, síðani kemur kursurin á Statoil-partabrævinum, og sum tað triðja oljuprísurin. Vit fingu greitt at vita, at raðfylgjan er ikki tilvildarlig, greiðir Sámal Sivertsen frá.

Í februar fekk Supply Service fótin innum hjá norska oljurisanum, ið leigar spildurnýggja veitingarskipið Sjóborg til tænastur fyri Statoil, fyribils í eitt hálvt ár, men við møguleika at leingja í eitt ár. Sáttmálin ger skip og manning til part av arbeiðsskaða hagtølunum hjá Statoil og harvið øllum tí, ið Statoil fegin vil standa fyri.

–Vit eru eitt nýtt og lítið reiðarí, og skulu tí alla tíðina sannføra okkara kundar um, at vit megna uppgávurnar og lúka tey krøv, ið verða sett okkum. Har er trygdarmentanin ein avgerandi faktorur, sigur Sámal Sivertsen og nevnir sum dømi, at oljufeløgini vilja hava øll data og allan statistikk fyri bókstaviliga alt virksemið hjá Supply Service.

– Eg kann so sjálvandi vísa á, at vit hava nýggj og framkomin skip. Men so kemur alt hitt. Vit skulu prógva, hvat vit ítøkiliga gera fyri at dálka sum minst og verja umhvørvið sum mest. Til dømis verður 80 prosent av øllum ruskinum umborð skilt sundur, vit hava statistikk yvir nýtsluna av allari máling og allari sápu umborð og so framvegis, sigur Sámal Sivertsen og leitar fram teldupostin frá degnum fyri við mánaðaryvirlitinum yvir máling, sápu og rusk.

Upplýsingarnar hava týdning, tí oljufeløgini skulu til eina og hvørja tíð kunna prógva fyri kundum og myndugleikunum, neyvt hvørji atlit tey taka til umhvørvið. Sámal Sivertsen dylir tó ikki yvir, at fyri eitt reiðarí fylgir eisini ein fíggjarligur síðuvinningur við, tí sjálvandi eru nógvir pengar at spara við at hava neyva stýring á allari nýtslu umborð.

Umframt at fáa regluligar rapporteringar frá skipunum hjá Supply Service vitjar Sámal Sivertsen javnan umborð fyri at dupultkekka, um nú skipini lúka øll krøv frá myndugleikunum, um nú eisini alt verður skrásett og fráboðað og niðurskrivaðar mannagongdir verða hildnar. Hesar vitjanir eru eitt krav frá kundunum, umframt eitt gott høvi hjá reiðarínum at fylgja upp og tryggja, at gjørdar avtalur verða hildnar. Harafturat vitja umboð frá oljufeløgunum av og á skipini, umframt eftirlitisvitjanirnar frá Det Norske Veritas.

## UMDØMIÐ

Tað er ikki uttan orsøk, at eitt reiðarí sum Supply Service hevur ein persón í starvi sum HSEQ & Crew Manager. HSEQ stendur fyri Health, Safety, Environment og Quality, og yvirskipað eru uppgávurnar at fyribyrgja stórvanlukkum, at forða fyri at fólk fær skaða í arbeiðnum og at verja umhvørvið við at dálka so lítið sum tilber.

Ræðumyndirnar frá stórvanlukkum í oljuvinnuni hava tað við at brenna seg fastar í minnið hjá fólki í áratíggju. 23 ár seinni minnast vit enn vanlukkuna við Exxon Valdes í Prince William sundinum í Alaska. 19 ár seinni minnast vit enn vanlukkuna við Braer í Hetlandi. Og døggfeskt í minninum er sjálvandi vanlukkan við Deepwater Horizon í Meksikoflógvanum fyri tveimum ár-

um síðani, sum broytti ímyndina av bretska oljurisanum BP og setti ein svartan, skitnan oljublett á grøn-gula blómubúmerkið. Í hjalarvørrinum á Exxon Valdes vanlukkuni kom ein lang røð av trygdarábøtum og – krøvum, meðan BP enn stríðist við at reinsa skitna umdømið av sær, hóast tað í roynd og veru var ein undirveitari, Transocean Ltd, ið átti boripallin Deepwater Horizon.

–Gott umdømi hevur avgjørt stóran týdning. Torført er sjálvandi at meta um eins egna umdømi, men sum reiðarí merkir tú tað so í øllum føri, um umdømið gerst vánaligt. Tí má okkara reiðarí fyri alt í verðini ikki koma í støður, ið ávirka umdømið skeiva vegin. Og tí mugu vit gera alt fyri støðugt at menna okkara trygdarmentan, sigur Sámal Sivertsen.

### TRÍVAST Í TRYGDINI

Hóast neyvar og niðurskrivaðar mannagongdir, kekklistar og fráboðanir eru partur av gerandisdegnum umborð, so tykist manningin at trívast við tí.

–Nú eru vit sjálvandi eitt lutfalsliga nýtt reiðarí, men higartil er útskiftingin av fólki sera lítil. Í fjør høvdu vit umleið 60 fólk í starvi, og bara ein maður fór úr reiðarínum. Í ár hava vit sett fólk til Sjóborg og seinastu fólkini til Tórsborg verða sett í mai. Vit fáa umsóknir at kalla hvønn dag, og tað tykist ikki sum okkara trygdarmentan styggir fólk burtur, metir Sámal Sivertsen.

Øll starvsfólk hjá Supply Service skriva undir uppá, at tey góðtaka politikkin hjá reiðarínum, tað veri seg innan trygd, rúsdrekka og so framvegis. Men uppgávan og avbjóðingin hjá Sámali Sivertsen í hesum sambandi er at fáa trygdina undir húðina á teimum tilsamans 96 fólkunum, sum manna Eldborg, Sæborg, Sjóborg og Tórsborg.

– Mínar royndir eru, at trygdarkrøvini ræða ikki fólk burtur. Hinvegin, gera tey tað, so skal man skifta bransju, tí frálandavinnan her á okkara leiðum setir hørð krøv til trygdina, óansæð hvørjum reiðaríi tú mynstrar við.

Trygdin er snøgt sagt ein týðandi faktorur í kappingini millum reiðaríini.

– Okkara kappingarneytar hava eisini stór, nýggj og framkomin skip við dugnaligum manningum. Avgerandi fyri at fáa sáttmálarnar við oljufeløgini er tí at hava eina betri trygdarmentan enn kappingarneytarnir, sigur Sámal Sivertsen.

Sum eitt lutfalsliga nýtt reiðarí er tað ein avbjóðing hjá Supply Service at seta tey røttu fólkini í starv. Felagið hevur lagt seg eftir, burturav at seta føroyingar í starv. Av tí at fýra skip skulu mannast eftir lutfalsliga stuttari tíð koma nakrir av hægru yvirmonnunum úr øðrum reiðaríum, men felagið vil eisini hava ungar føroyingar við, til dømis sum 2. stýrmenn.

–Vit byggja upp okkara egnu trygdarmentan, men í hesum arbeiðinum lurta vit sjálvandi eftir teimum góðu royndum, ið fólk hava nomið sær hjá øðrum reiðaríum. Málið er, at frágongdin av fólki til eina og hvørja tíð skal vera so lítil sum yvirhøvur tilber. Tí góð og stabil fólk hava alt at siga í okkara vinnu, sigur Sámal Sivertsen.

*Statoil:*

## Vil ganga á odda við trygdini

**Lyklaorðið fyri at fáa fótin innum hjá oljurisanum Statoil er trygd. Tað gjørdi leiðarin fyri sjódeildina hjá Statoil greitt, tá hann heilsaði Sjóborg vælkomnari í vinnu fyri Statoil.**

-Málið hjá Statoil er at ganga á odda og leggja støðið, tá talan er um trygdina. Eitt miðvíst arbeiði vil bæði minka um vandan fyri stórum vanlukkum og smærri arbeiðsóhappum. Tað segði Jon Slinde, leiðari fyri sjódeildina hjá Statoil, í síni heilsan til Sjóborg og reiðaríið Supply Service.

Hansara høvuðsuppgávur eru at forða fyri stórvanlukkum og øðrum óhappum, umframt halda fokus á eina góða trygdarmentan, ið skal tryggja at eingin kemur til skaða í arbeiði fyri Statoil.

–Fyri at røkka hesum málum mugu vit kunna líta á góða arbeiðið, ið Supply Service ger á hesum øki. Vit vilja gera sáttmálar við reiðarí og veitarar, sum vilja taka ábyrgd og binda seg til at røkka úrslitum á trygdarøkinum.

–Krøvini um effektivitet hava sjálvandi týdning, men tað má ongantíð ganga so skjótt, at slakað verður við trygdini. Eru vit í iva, so eru vit ikki í iva. Vit velja tryggu loysnina. Vit steðga arbeiðum, ið vit ikki hava fult tamarhald á ella har vit ikki til fulnar kenna váðan. Tá taka vit ein „time out."

Sambært Jon Slinde er manningin lykilin til at skapa rætta hugburðin til trygd og harvið eisini lykilin til eina góða trygdarmentan umborð.

# KSS
KLAKSVÍKAR SLEIPISTØÐ

KLAKSVÍKAR SLEIPISTØÐ

CAT MaK




Vit bjóða eitt breitt úrval av **tænastum, bæði til skip og virkir**

- Beding upp til 800 tons, 65 mLOA
- Væl útgjørd smiðja við bryggjukant
- Vit sertifikatsveisa
- Vit gera hydraulikslangur
- Rustfríur verkstaður
- Stór stálgoymsla
- Tekningar við CAD
- Søla av pakkdósum, boltum, legum, tetningsringum, rørkoblingum, filtrum v.m.

**DØGN**TÆNASTAN
Tel. +298 472030

Kósaskákið 3 FO-700 Klaksvík TEL. 47 20 30 FAX: 47 20 31 T-post: kss@kss.fo www.kss.fo






Neyðstøður á sjónum krevja ein bjargingarbát, sum er álítandi og skjótur at sleppa í. Tíðin er avgerandi, og fullkomilig vissa má vera fyri, at báturin virkar. Fyrstu ferð.

Set títt álit á eitt gott merki og eina ábyrgdarfulla tænastu. Fønix umboðar viðurkendu bjargingarbátarnar RFD og DSB, ið fáast til bátar og størri skip. Og Fønix er góðkent at veita tænastu og eftirlit, ið livir upp til øll krøv.

Fønix - á Hjalla, Hoyvík - Tel. 31 16 31 - www.fonix.fo

Fønix
Tryggleiki til heimið, virkið og skipið



lív.fo
Fá eitt ríkt lív
Lív hjálpir tær at fáa tað fíggjarliga í trygga legu
Persónlig eftirløn
Lívið lagar seg ymiskt fyri okkum øll. Tí hava vit eisini tørv á ymiskum eftirlønum. Sum Føroya størsta og royndasta eftirlønarfelag, veitir Lív tær eina persónliga eftirløn. Vit hjálpa tær at laga tína eftirløn til tað lív, tú vilt liva og til ta framtíð, tú hevur útlit til.
Kom inn á **liv.fo** og fá innlit í, hvør eftirløn hóskar best til tín.
Innlit í útlit
ekko 239 239

# Indian Point Energy Center



Sum partur av námsferðini, hjá maskinmeistaraflokkinum 09M1, í New York varð vitjað á kjarnorkuverkinum „Indian Point Energy Center", sum liggur umleið 80 km. norðan fyri New York, útímóti Hudson ánni.

Verkið hevur tveir kjarnorkureaktorar, sum tilsamans kunnu framleiða 2 GW. Til samanbering kann nevnast, at Sundsverkið hevur ein kapasitet uppá 47,24 MW.

*Eftir: Næmingar á Vinnuháskúlanum*

## EINDIRNAR

Verkið hevur tríggjar eindir, sum vera róptar Eind-1, Eind-2 og Eind-3.

Eind-1 byrjaði at framleiða orku í 1962, men bleiv tikið úr drift í 1974, av tí at køliskipanin til kjarnukølingina ikki kundi lúka herdu trygdarkrøvini. Men longu í 1974 byrjaði Eind-2 at framleiða orku, og í 1976 bleiv Eind-3 tikin í nýtslu. Í dag framleiða Eind-2 og Eind-3 30% av orkuni, sum staturin New York hevur tørv á. Eitt kjarnorkuverk skal helst vera fult lastað allatíð, og tí verða hesi brúkt sum grundlast meðan fossil el-orkuverk regulera el-orkuna tey geva, til tørvin eitthvørt tíðspunkt.

## 1500 TIL 2500 STARVSFÓLK

1.500 fólk starvast á verkinum, harav starvast 100 fólk einans við at halda verkið trygt. Tá árligu viðlíkahaldsarbeiðini verða gjørd, starvast tó eini 2.500 fólk á verkinum í nakrar mánaðir. Tað ganga 2 ár ímillum, at viðlíkahald verður gjørt á sjálvan kjarnorkureaktorin, og brúktu kjarnorkustavarnir verða skiftir út. Hetta er lagt til rættis soleiðis, at tey taka ein reaktor úr drift í senn hvørt vár.

## FACEBOOK HJÁLPTI

Tað var ein avbjóðing, at fáa samband við verkið, men har kom facebook okkum til hjálpar, tí ígjøgnum facebook-síðuna hjá Indian Point Energy Center fingu vit at vita, at vit skuldu seta okkum í samband við Patrick Falciano. Hann tók ímóti okkum, tá vit komu til verkið og hjálpti okkum at útfylla øll pappír sum kravdust, og at fáa trygdargóðkenningina fyri at sleppa inn.
Vit fingu at vita, at okkara persónsupplýsingar vóru koyrdar ígjøgnum FBI-registarið fyri at vita um nakað illgrunasamt kom fram, og tað, at vit fingu loyvi at koma at vitja verkið, merkir, at FBI einki illgrunasamt fann um okkum.

Patrick hevur arbeitt á verkinum í 40 ár, men hevur nú egna fyritøku, har hann millum annað skipar fyri vitjanum á verkinum fyri lesandi og fólki, sum hava áhuga fyri



kjarnorku. Harumframt verður eisini skipa fyri túrum fyri fólki, sum býr í nærumhvørvinum har verkið liggur.

## KJARNORKA OG TRYGD

Fólk flest vita lítið um kjarnorku, og hava ótrúliga løgnar hugsanir um, hvat kjarnorka er, hvussu kjarnorkustráling ávirkar fólk og, hvussu kjarnorka skal handfarast.

Entergy er fyritøkan, sum eigur verkið og tey vita, hvussu lítið fólk vita um kjarnorku. Tí bjóða tey fólki at koma á verkið at síggja, hvussu útgerðin sær út, at kunna um, hvussu radioaktiva evnið verður handfarið, og hvussu strong trygdarkrøv eru til kjarnorkuverk.

## 5 ELLA 7 TÍMAR TIL VITJANINA

Vit kundu velja um vit vildu brúka 5 ella 7 tímar til vitjanina, og tá Patrick ráddi okkum til at taka longru vitjanina, fyri at síggja so nógv sum møguligt, gjørdu vit sjálvandi tað.

Fyrsti partur av vitjanini var kunning. Hetta var eitt skeið um stráling, sum øll, sum fara inn á eitt kjarnorkuverk skulu ígjøgnum. Vit fingu eina rúgvu at vita um stráling um, hvussu nógv verður gjørt fyri at verja fólkið, sum arbeiðir á verkinum, um hvussu nógv verður gjørt fyri at verja sjálvt verkið ímóti yvirgangsálopum og, hvussu strong krøvini eru til starvsfólkini, sum arbeiða á verkinum.

## WORLD TRADE CENTER ÁLOP

Um eitt líknandi yvirgangsálop, sum bleiv framt ímóti World Trade Center, hevði verið framt ímóti Indian Point Energy Center, hevði allarhelst einki hent við kjarnorkureaktorinum, tí betongkupilin, sum reaktorarnir sita í, eru so sterkt armeraðir.

Ein roynd er gjørd fyri at vita um hetta veruliga er so. Eitt video, sum eitur „Plane and concrete wall“ (tað liggur á Youtube) vísir upptøkur frá royndini.

Javnan eru eisini venjingar har hermenn spæla, at teir fremja álop á verkið, og trygdarfólkini á verkinum hevur ábyrgd at verja verkið.

Higartil eru álopini blivin bast langt áðrenn nakar veruligur vandi hevur verið á ferð.



betri.fo

# Fá upp til
# 32% í avsláttri

**Betri pensjón tryggjar tær eina munagóða samansparing, sum leggur lunnar undir eina framhaldandi vælferð, tá ið tú fert frá fyri aldur.**

- Vit samanseta pensjón og tryggingar eftir tínum tørvi
- Vit umsita tína pensjón við størsta vinningi fyri eyga
- Umvegis Netpensjón hevur tú fult gjøgnumskygni

**Savnar tú tryggingar og pensjón hjá okkum, kanst tú fáa upp til 32% í avsláttri.**





**Hevur tú spurningar, ella kundi hugsað tær betri frágreiðing, set teg í samband við okkum á 345 700 ella betri@betri.fo**

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón